Búskaparráðið

# FØROYSKI BÚSKAPURIN

## Várið 2026

Konjunkturfrágreiðing

**Report from the Economic Council of the Faroe Islands**
**Autumn 2026**

**Búskaparráðið**

Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og veita óhefta búskaparliga ráðgeving og gera frágreiðingar um búskaparligu gongdina. Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við løgtingslóg nr. 72 frá 10. mai 2021 løgd til Landsbanka Føroya at røkja, og Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir lóg um Búskaparráð skal gerast tvær ferðir árliga; ávikavist tann 1. mars og 1. septembur.

**Limir Búskaparráðsins eru:**
Johnny í Grótinum, formaður, cand.polit
Anja Rein, Diplomútbúgving innan banka og MSc í leiðslu
Hans Ellefsen, PhD. í búskaparfrøði
Jan Otto S. Holm, cand.merc.fir
Marjun Weihe Thomassen, cand.merc.aef

**Skrivarar Búskaparráðsins:**
Landsbanki Føroya, samstarv er við Hagstovu Føroya.

ISBN: 978-99918-3-934-9

# Innihaldsyvirlit

Samandráttur ........ 4

Konjunkturfrágreiðing – várið 2026 ........ 6

Búskaparligar ábendingar ........ 7

Starvsfólk, lønargjaldingar og arbeiðsloysi ........ 8

Inflatión ........ 10

Altjóða útlit ........ 11

Húsarhaldini ........ 13

Vinnan ........ 20

Útlendsk arbeiðsmegi ........ 22

Uttanlandshandil ........ 25

Botnfiskiskapurin ........ 28

Almenna fíggjarstøðan og útlit ........ 31

Almenn skuld ........ 36

BTÚ í føstum prísum ........ 38

Fylgiskjal ........ 42

Keldur ........ 44

Tíðindaskriv ........ 45

Notur ........ 49

# Samandráttur

### Búskaparligu vísitølini eru framvegis positiv

Búskaparráðið hevur í samstarvi við Hagstovu Føroya mett um vøksturin í BTÚ fyri árini 2025 – 2027. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum er mettur til at vera ávikavist 5,8% í 2025, 6,2% 2026 og 3,3% í 2027, sí talvuna niðanfyri. Árligi realvøksturin var lækkandi árini fram til 2024, tá ið hann einans var 0,8%, men mett verður, at realvøksturin í 2025 var nakað hægri, enn í 2024.

**BTÚ í leypandi prísum, mia. kr. og vøkstur**

| | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ í ársins prísum (mia. kr.) | 27.2 | 27.9 | 29,6 | 31,4 | 32,4 |
| Árligur vøkstur í ársins prísum (%) | 6.2 | 2.9 | 5,8 | 6,2 | 3,3 |
| Árligur realvøkstur (%) | 3.2 | 0.8 | | | |

Viðm.: BTÚ í 2023 og 2024 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2025 - 2027 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
Kelda: Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Í heyst metti Búskaparráðið vøksturin í BTÚ í leypandi prísum at verða 2,0% í 2025, meðan nýggja metingin sigur 5,8% í 2025. Høvuðsorsøkin til stóra munin er, at útflutningurin vísti seg at gerast væl frægari í 2025, enn væntað, og tað stavar millum annað frá øktum útfluttum nøgdum av laksi og øktum prísum á makreli og botnfiski.

Tað, sum togar vøksturin upp í BTÚ í 2026, eru privata nýtslan og útflutningurin, og harafturat geva almenna nýtslan og privatu íløgurnar eisini síni íkast til vøksturin. Somu viðurskifti toga vøksturin upp í 2027, men í minni mun, enn í 2026. Fyri pelagiska fiskiskapin væntast betri prísir í 2026, hóast kvotuniðurskurð á makreli og svartkjafti. Harafturat væntast ein vøkstur í bæði nøgd og prís á laksi, ið merkir, at útflutningsvirðið væntast at økjast í 2026. Í búskapinum mæla hjólini framvegis við góðari ferð. Starvsfólkatalið er veksandi, arbeiðsloysið er lágt, og stórur vøkstur er í lønargjaldingunum. Treystið hjá húsarhaldunum er óbroytt í nýggjastu brúkarakanningini, og kortnýtslan er økt í 2025. Peningastovnarnir vísa á, at fíggjarliga støðan hjá húsarhaldunum er batnað vegna lønarhækkingar og rentulækkingar, og harafturat er inflatiónin lág. Handilsvinnan er bjartskygd og væntar hægri sølu komandi árið. Byggivinnan er hinvegin eitt sindur minni bjartskygd, og sigur seg hava tryggjað arbeiði í eitt sindur færri mánaðar, enn áður. Í tilfeingisvinnuni er treystið hækkað eitt vet, allarhelst tí fiskiskapurin undir Føroyum hilnaðist sera væl í 2025.

### Land og kommunur hava framvegis hall

Hall landskassans verður mett at vera 50 mió. kr. í 2025, 368 mió. kr. í 2026 og 207 mió. kr. í 2027. Í heyst var mett, at úrslitið á landsroknskapinum fyri 2025 fór at vera eitt hall á 390 mió. Fyribils metingin er tó, at hallið verður 50 mió. kr. í 2025. Tað er væl betri, enn mett í heyst, og tað er gott. Høvuðsorsøkin er, at raksturin er betraður. Hinvegin er tað framvegis

hall í allarbestu búskaparligu tíðum. Somuleiðis var stórt hall hjá kommunum í 2024, men í 2025 væntast úrslitið hjá kommununum at gerast frægari, enn í 2024. Tað er ikki skynsom fíggjarpolitisk stýring at lata vaksandi almennar inntøkur – vegna góðar tíðir – elva til ótálmaðan vøkstur í almennu útreiðslunum. Tað er við til at gera búskapin yvirhitaðan, og alt samfelagið rindar fyri tað við hægri prísum. Samstundis er eingin almenn uppsparing til, tá ið tíðirnar venda, og tað kann gera tað neyðugt at tátta í um gongdin vendir, og tað kann gera eina búskaparliga niðurgongd enn verri.

Tað er bráðneyðugt at fáa búskapin hjá tí almenna at hanga saman nú og í framtíðini, men politiski myndugleikin er sera trekur at gera tær nýskipanir og sparingar, ið skulu til. Eitt nú hevur Løgtingið júst samtykt at fara undir at fyrireika, prosjektera og bjóða út ein undirsjóvartunnil til Suðuroyar – áðrenn loysn er funnin á avbjóðingini at tryggja fíggjarpolitiska haldførið. Kostnaðarmetingin er slakar 5 milliardir krónur, meðan framskrivingar vísa vaksandi hall á fíggjarlógunum næstu 10 árini uttan nýskipanir. Tað er ábyrgdarleyst. Neyðugt er at gera eina ítøkiliga ætlan fyri, hvussu málið um fíggjarpolitiskt haldføri verður nátt.

### Setið í verk nýskipanir og sparingar

Nøkur dømir á nýskipanir og sparingar, er at lækka talið av kommunum, at fáa dupultfunktiónir burtur á eitt nú sjúkrahúsøkinum, og millum land og kommunur á almannaøkinum. Somuleiðis eru nógvir smáir fólkaskúlar og stovnar, bæði í almannaverkinum og á eldraøkinum. Fyri at betra um fíggjarliga úrslitið eru møguleikar at betra um inntøkurnar. Til ber at økja um tilfeingisinntøkurnar frá fiskivinnuni og alivinnuni. Annað dømi er at økja partafelagsskattin, sum er lægri í Føroyum enn í øllum hinum Norðanlondunum.

### Avbjóðingin við bústaðartrotinum má takast í álvara

Sethúsaprísirnir halda áfram at veksa, og tað bendir á, at útboðið framvegis er ov lágt. Neyðugt er, at politiski myndugleikin ger nakað fyri at veksa um útboðið av bústøðum, tí ein týðandi fortreyt fyri at fáa fólki at støðast í Føroyum, er at tað er møguligt at fáa eitt býli. Kommunurnar eiga sín leiklut í bústaðartrotinum, tí tað eru tær, ið veita byggiloyvi og gera lendi byggiklár. Harafturat standa býli tóm í fleiri kommunum. Til ber at áseta bústaðarskyldu og at avmarka stutttíðarleigu. Onnur tiltøk kunnu vera at áseta fastognarskatt, sum avmarkar eftirspurningin og ger prísgongdina meira støðuga yvir tíð, og harafturat kann rentustuðulin stigvíst takast burtur.

### Føroyar eiga at stýra veiðitrýstinum við kvotum

Toskastovnurin er vorðin eitt vet betri fyri, og er vandi fyri, at øll skipini leggja seg eftir at fiska tosk nú, tá ið prísurin á toski er høgur. Við hesum gerst veiðitrýstið eftir toski ov høgt. Neyðugt er at stýra, hvussu nógvur fiskur verður tikin úr stovninum á hvørjum ári. Mælt verður til at broyta skipanina frá fiskidøgum til kvotur, tí tað verður mett at vera eitt betri stýringsamboð fyri veiðitrýstinum á ymsu fiskastovnunum, bæði lívfrøðiliga og búskaparliga.

# Konjunkturfrágreiðing – várið 2026

# 01
# Búskaparligar ábendingar

### Meting av vøkstrinum í BTÚ

Búskaparráðið hevur í samstarvi við Hagstovu Føroya mett um vøksturin í BTÚ fyri árini 2025 – 2027. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum er mettur at vera ávikavist 5,8% í 2025, 6,2% 2026 og 3,3% í 2027, sí talvu 1.1 niðanfyri. Árligi realvøksturin hevur verið lækkandi árini fram til 2024, tá ið hann einans var 0,8%, men mett verður, at realvøksturin í 2025 var nakað hægri.

**Talva 1.1 BTÚ í leypandi prísum, mia. kr. og vøkstur**

| | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ í ársins prísum (mia. kr.) | 27.2 | 27.9 | 29,6 | 31,4 | 32,4 |
| Árligur vøkstur í ársins prísum (%) | 6.2 | 2.9 | 5,8 | 6,2 | 3,3 |
| Árligur realvøkstur (%) | 3.2 | 0.8 | | | |

Viðm.: 2023 og 2024 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2025 - 2027 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
Kelda: Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Búskaparligu lyklatølini eru framvegis positiv; starvsfólkatalið er veksandi, arbeiðsloysið er lágt, og stórur vøkstur er í lønargjaldingunum. Eisini hava húsarhaldini fingið lønarhækkingar, sum stuðlar undir privatu nýtsluna saman við lækkaðu rentuni og inflatiónini. Tað eru fyrst og fremst privata nýtslan og útflutningurin, sum toga vøksturin upp í BTÚ 2026, men almenna nýtslan og privatu íløgurnar geva eisini síni íkast til vøksturin. Somu viðurskifti toga vøksturin upp í 2027, tó í minni mun, enn í 2026. Fyri pelagiska fiskiskapin væntast betri prísir í 2026, hóast kvotuniðurskurð á makreli og svartkjafti. Harafturat væntast vøkstur í bæði nøgd og prís á laksi, ið gevur økt mett útflutningsvirði í 2026. Hóast toskakvotan í Barentshavinum minkar í 2026, væntast sum heild góð útlit fyri útflutningin av toski, tí høgi prísurin á botnfiski í 2025 væntast at halda sær í 2026, samstundis sum útlitini fyri toskaveiðu á føroyskum sjóøki eru góð.

Í heyst metti Búskaparráðið vøksturin í BTÚ í leypandi prísum at verða 2,0% í 2025, meðan nýggja metingin sigur 5,8% í 2025. Høvuðsorsøkin til stóra munin er, at útlitini fyri útflutningin fyri 2025 vóru meira svartskygd á sumri 2025. Útflutningurin vísti seg tó at gerast væl frægari í 2025 enn væntað. Hóast laksaprísurin fall munandi í 2025, vaks útflutningsvirðið av laksi orsakað av stórum vøkstri í útfluttum nøgdum. Eisini vaks útflutningsvirðið av makreli munandi í 2025, hóast heildarkvotan minkaði. Hetta kemur av, at virkini, ið virka uppsjóvarfisk, í størri mun hava virkað innfluttan fisk. Harafturat gjørdist prísurin á makreli hægri, enn upprunaliga væntað. Útflutningsvirðið á botnfiski vaks somuleiðis munandi í 2025 samanborið við 2024, ið fyrst og fremst stavar frá prísvøkstri. Harumframt gjørdust privatu íløgurnar størri í 2025 enn upprunaliga væntað.

# Starvsfólk, lønargjaldingar og arbeiðsloysi

## Arbeiði er til allar hendur

Starvsfólkatalið var umleið 30.000 fólk í 2025 og arbeiðsloysið er framvegis á einum lágum støði, sí mynd 1.2. Lága arbeiðsloysið á 1% í januar 2025 merkir, at arbeiði er til allar hendur, og tað stuðlar undir privatu nýtsluna. Eitt sera lágt arbeiðsloysi hevur í longri tíð ta avleiðing, at framleiðslan í landinum verður minni, enn tað hon kundi verið, um trot ikki var á arbeiðsmegi, og tað tálmar búskaparvøksturin. Trot á arbeiðsmegi er ein fløskuhálsur og kann elva til lønartrýst, tá stórur eftirspurningur er eftir arbeiðsmegi og útboðið er avmarkað.

**Mynd 1.2 Tal av starvsfólkum og fulltíðararbeiðsleysum**

jan. 2021 – des. 2025




Viðm.: Árstíðarjavnað. Kelda: Hagstova Føroya.

Talva 1.2 vísir lønargjaldingarnar í samlaða búskapinum. Árligi vøksturin í samlaðu nominellu lønargjaldingunum hava ligið millum 4% og 7% frá 2021 til 2025. Tað eru fleiri krónur goldnar út til starvsfólk frá vinnuni samanborið við tí almenna.

| **Talva 1.2 Lønargjaldingar í samlaða búskapinum Mia. kr.** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|
| Samlaði búskapurin | 10,8 | 11,5 | 12,1 | 12,7 | 13,6 |
| Almenn fyrisiting og tænasta | 3,9 | 4,1 | 4,3 | 4,7 | 4,9 |
| Vinnan og almenn partafeløg (uttan fiskiveiða v.m.) | 5,7 | 5,9 | 6,3 | 6,5 | 6,9 |
| Fiskiveiða v.m. | 1,2 | 1,4 | 1,6 | 1,5 | 1,8 |
| | | | | | |
| **Árligur %-vøkstur** | | | | | |
| Samlaði búskapurin | 4% | 6% | 6% | 5% | 7% |
| Almenn fyrisiting og tænasta | 5% | 4% | 5% | 9% | 6% |
| Vinnan og almenn partafeløg (uttan fiskiveiða v.m.) | 4% | 5% | 5% | 4% | 5% |
| Fiskiveiða v.m. | -1% | 18% | 10% | -5% | 20% |

Viðm.: Lønargjaldingar, 12 mðr. samanlegging jan. - des. Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Tað eru fleiri orsøkir til vøksturin í lønargjaldingunum seinastu árini; millum annað lønarhækkan, at summir starvsbólkar hava fingið lønarlyft, og at tað hevur verið vøkstur í starvsfólkatalinum. Vøksturin í lønargjaldingunum hevur í vinnuni og almennu partafeløgunum verið rættiliga støðugur í tíðarskeiðinum 2021 til 2025; millum 4-5%. Gongdin í tí almenna er ikki heilt hin sama, talva 1.2 vísir, at vøksturin var slakari í 2022 og 2023 (4% og 5%), enn í 2024 og 2025, tá ið vøksturin í lønargjaldingunum var ávikavist 9% og 6%.

**Realur lønarvøkstur**

Lønargjaldingar eru allar útgoldnu lønirnar samanlagt. Tað merkir, at lønargjaldingarnar veksa, tá ið fleiri starvsfólk leggjast afturat starvsfólkahópinum, og tá ið fólk arbeiða yvirtíð ella fáa lønarhækkan. Tískil kann vøksturin í lønargjaldingunum ikki tulkast sum reallønarvøkstur. Til at rokna realan lønarvøkstur krevjast lønarhagtøl, tað vil siga løn fyri hvønn arbeiddan tíma, sum tað enn ikki finnast hagtøl fyri. Eitt boð uppá eina roknaða realløn verður tí gjørd við at draga prísvøkstur og vøkstur í starvsfólki frá samlaðu lønargjaldingunum, sí mynd 1.3. Í mynd 1.3 eru lønargjaldingar í fiskivinnuni tiknar burturúr, tí lønargjaldingarnar í fiskivinnuni eru tengdar at veiðuni, kvotum og altjóða fiskaprísum.

**Mynd 1.3 Reallønargongd fyri hvørt starvsfólk**




Viðm.: Árlig reallønargongd í miðal fyri hvørt starvsfólk. Indeks 2015. Almenn partafeløg eru íroknaði í vinnuni. Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Mynd 1.3 vísir, at reali lønarvøksturin hjá alment løntum og starvsfólki í vinnuni fylgjast væl at. Fallið í reallønini vegna høga inflatión í 2022 og 2023 er innheintað eftirfylgjandi árini, og reala lønarlagið er í dag eitt vet hægri, enn í 2021. Yvirskipað er reala lønarlagið 11-12% hægri samanborið við lønarlagið í 2015. Á arbeiðsmarknaðum sum heild er tað vanliga soleiðis, at privata vinnan setir lønirnar fyrst, har reallønarvøksturin verður settur eftir mettum produktivitetsvøkstri í búskapinum. Tað vil siga, at nominella lønarhækkingin svarar til produktivitetsvøkstur pluss væntaða inflatión. Sambært gongdini í grafinum omanfyri, hava privatu og almennu lønirnar fylgst rættiliga væl í Føroyum, hóast tað ikki hevur verið nøkur formskipað tilgongd viðvíkjandi raðfylgjuni í lønarásetingini. Fylgja

almennu lønirnar ikki somu gongd, sum í privatu vinnuni, verður atdráttarmegin at arbeiða í tí almenna minkandi, tí lønarlagið tá dragnar samanborið við privata arbeiðsmarknaðin. At privata vinnan var lønarførandi sæst aftur á mynd 1.3, tó uttan tey seinastu 2 árini (2024 og 2025), ið serliga kom av lønarlyfti og lønarhækkan hjá ymsum fakbólkum. Um reali lønarvøksturin hjá tí almenna í 2026 verður tann sami, sum tann á privata arbeiðsmarknaðinum var í 2025, kann hann væntast at liggja á umleið 4%.

Lønarkarmur fyri 12 fakfeløg er júst undirskrivaður (feb. 2026) á almenna arbeiðsmarknaðinum við einum lønarkarmi á 3,87% og er galdandi fyri 2025. Tey 12 fakfeløgini fevna um áleið 45% av starvsfólkunum hjá landinum. Lønarkarmurin tekur hædd fyri bæði inflatión og produktivitetsvøkstri. Um lønarkarmurin verður samanborin við gongdina tey seinastu 10 árini (2016-2025), so hevur reali miðallønarvøksturin verið 1,13% hjá vinnuni (privatu vinnuni og almennu partafeløgunum), og 1,06% hjá tí almenna. Skal miðal reallønarvøksturin samanberast við nýggja lønarkarmin, skal prísvøksturin fyri 2025 á 0,9 leggjast aftrat og tá verður miðal lønarvøksturin 2,03% hjá vinnuni og 1,96% hjá tí almenna, ið er væl lægri, enn lønarkarmurin hjá teimum 12 fakfeløgunum. Tað skal leggjast aftrat, at reallønarvøksturin frá einum ári til annað er ikki avgerandi, men tað er samlaða gongdin yvir fleiri ár, ið hevur týdning.

# Inflatión

### Inflatiónin er minkað

Árligu broytingarnar í brúkaraprístalinum eru eitt mát fyri inflatiónina í Føroyum. Nýggjastu tølini frá Hagstovu Føroya vísa ein vøkstur í brúkaraprístalinum á 0,7% í fjórða ársfjórðingi 2025, sí mynd 1.4.

**Mynd 1.4 Brúkaraprístalið, %-broyting og vakstrarískoyti 2021-2025**




Viðm.: Annað er 02 rúsdrekka og tubbak, 03 klædnavørur og fótbúnaður, 05 húsbúnaður og húshaldsútgerð, 06 heilsa, 08 samskifti, 09 frítíð og mentan, 10 útbúgving, 11 hotel og matveitarar og 12 ymiskar vørur og tænastur.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Øktir matvøruprísir toga enn einaferð upp í brúkaraprístalinum, meðan býli togar vøksturin í brúkaraprístalinum niður í fjórða ársfjórðingi 2025 vegna rentulækkingar og lægri prísum á brennievni. Samstundis er húsaleigan vaksin við góðum 11% í fjórða ársfjórðingi 2025, tí húsaleiga í bólkinum býli fylgir gongdini í sethúsaprísunum.

Vektargrundarlagið fyri vørur og tænastur, sum verður nýtt til at gera upp brúkaraprístalið, er frá 1. ársfjórðingi 2009, sum byggir á eina brúkarakanning frá 2007. Brúkaraprístalið eigur at verða tikið við fyrivarni, tí tað hevur sum fortreyt, at føroyingar ikki hava broytt nýtslumynstur hesi seinastu 18 árini. Væntast kann bæði, at keypsmynstrið er broytt, har brúkarin hevur flutt seg frá teim mest dýrkaðu vørunum til bíligari vørur, og harumframt eru tað væntandi fleiri vørubólkar, sum í dag fylla nógv hjá føroyska brúkaranum, sum nærum ikki vóru til í 2009. Vektargrundarlagið eigur tí at verða dagført.

## Altjóða útlit

Sambært metingum frá altjóða gjaldoyragrunninum, IMF, um heimsbúskaparligu støðuna, verður í løtuni roknað við, at vøksturin í heimsbúskapinum fer at halda fram komandi árini. Roknað verður við realvøkstri á ávikavist 3,3% í 2026 og 3,2 % í 2027. Hetta er eitt vet hægri enn áður mett og verður millum annað mett at stava frá útlitum til lagalig fíggjar- og pengapolitisk átøk, stórum íløgum í tøknilig frambrot, og evnum hjá privata geiranum at tillaga seg – hóast politiskar trætur og vanda fyri minni altjóða samhandli. Væntað verður eisini, at inflatiónin yvirskipað fer at halda fram við at lækka, hóast leiðin móti langtíðar málum fyri inflatiónina verður ymisk frá einum landi til annað. Til dømis verður roknað við, at gongdin móti langtíðar málinum fyri inflatiónina verður nakað drúgvari í USA enn í fleiri øðrum londum.

Aftrat teimum omanfyrinevndu váðunum frá politiskum trætum og minni altjóða samhandli metir IMF eisini, at váðar eru knýttir at teimum stóru vónunum og íløgunum í tøknigeiranum, serliga innan vitlíki. Eisini verða stór statsskuld og møgulig óvæntað hækking í prísstøði nevnd sum váðar at fylgja við heimsbúskaparliga.[1]

Hóast fíggjarligar, makrobúskaparligar og geopolitiskar váðar, og hóast tíðarskeið við øktum sveiggjum á partabræva- og rávørumarknaðum higartil í ár, eru íleggjarar á fíggjarmarknaðum framvegis varliga bjartskygdir um útlitini fyri 2026. Lagaligur fíggjar- og pengapolitikkur, til dømis stórar almennar íløgur í verju- og infrakervi, og útlit til lægri leiðandi rentur í USA, og vónir um framhaldandi inntøkuvøkstur hjá fyritøkum, eru nakrar av orsøkunum. Harumframt rokna fleiri íleggjarar við møguligum undanvindi frá politiskum átøkum í USA, nú slík skulu setast í verk fram ímóti amerikanska miðskeiðisvalinum, sum verður seinni í ár.

Sum altíð á fíggjarmarknaðum eru tó eisini váðar. Ein teirra er tengdur at teimum stóru vónunum um vinning frá tøkniligum frambrotum, serliga innan vitlíki, og teimum umfatandi íløgunum, sum verða gjørdar fyri at røkka hesum vinningi. Tá væntanirnar eru høgar og

lutfalsliga einstáttaðar, sum tær hava verið í samband við vitlíki seinastu tíðina, kunnu tíðindi, ið eru verri enn væntað, ávirka marknaðirnar lutfalsliga nógv skeiva vegin.

Pengapolitikkur er somuleiðis ein óvissa og kann serliga koma í fokus, um inflatiónin vísir seg at vera hægri enn væntað, ella um lyklatølini framhaldandi fara at benda á ein viknandi arbeiðsmarknað í USA. Harumframt fáa høgar almennar skuldarstøður hjá fleiri av heimsins størstu tjóðum alsamt størri ans, og eisini kann gongdin í framhaldandi geopolitiskum stríði skjótt broyta váðamyndina.

02
# Húsarhaldini

Nýtslan hjá húsarhaldunum er ein stórur partur av samlaða eftirspurninginum í føroyska búskapinum. Tí kunnu broytingar í viðurskiftum, sum ávirka nýtsluna, ávirka virksemið í samfelagnum. Ynskiligt hevði verið við neyvari uppgerðum av sjálvari privatu nýtsluni í samlaða eftirspurninginum í tjóðarroknskapinum. Men tá hetta ikki er tøkt, verða í staðin ymisk viðurskifti eygleidd, sum sannlíkt ávirka nýtsluna jaliga og neiliga. Hesi viðurskifti eru millum annað vísitølini í konjunkturbarometrinum hjá Hagstovu Føroya, og gjaldskortnýtslan sambært uppgerðum frá bankunum.

### Treystið hjá húsarhaldunum er óbroytt

Brúkaraávísin frá konjunkturbarometrinum hjá Hagstovu Føroya lýsir treystið hjá húsarhaldunum við nøkrum vísitølum. Treystitalið hjá føroysku húsarhaldunum er á sama støði í januar 2026, sum í seinastu kanning frá juni 2025. Treystitalið er -17 í januar 2026, sí mynd 2.1. Í 2022 fall vísitalið niðurum langtíðar miðalið orsakað av, at rentan og inflatiónin hækkaðu, og vísitalið er síðani ikki komið uppum langtíðarmiðalið aftur, hóast rentan og inflatiónin er lækkað aftur. Eisini hava húsarhaldini fingið lønarhækkan og skattalætta, men høga prísstøðið í Føroyum og spenta geopolitiska støðan úti í heimi kunnu vera nakrar av orsøkunum til lága vísitalið. Vísitalið er tó ikki eins lágt, sum tað hevur verið fyrr; í fíggjarkreppuni í 2008 minkaði tað niður í -37.

**Mynd 2.1 Brúkaraávísi jan. 2020 - jan. 2026**




Viðm.: "Miðal" er miðal av mátingum frá 2006 til 2026. Hagstova Føroya dagførdi í januar 2025, hvussu brúkaraávísin verður uppgjørdur, og eru tað aðrir spurningar sum nú samanvigað geva brúkaraávísan. Tað sæst eitt niveauskifti í brúkaraávísanum, sum er lægri samanborið við gamla uppgerðarháttin. Kelda: Hagstova Føroya.

Vísitalið er eitt samanvigað tal av úrslitum frá ymsum spurningum, sum húsarhaldini svara uppá. Í kanningini frá januar 2026 meta húsarhaldini sína fíggjarligu støðu vera verri í dag sammett fyri einum ári síðani, men tey vænta hana gerast frægari um eitt ár. Prísirnar á vørum og tænastum meta tey vera frægari í dag sammett við fyri einum árið síðani, men tey vænta ikki at fara at gera størri keyp komandi árið. Tó eru tað færri í kannignini frá januar 2026, enn í juni 2025, sum halda tað vera rætta løtan at spara upp, og eitt sindur færri

húsarhaldi siga hesaferð, at tey júst fáa endarnar at røkka saman, samanborið við kanningini frá í juni 2025.

Sambært umboð fyri peningastovnarnar, er fíggjarliga støðan hjá húsarhaldunum góð, og er hon batnað í 2025 samanborið við 2024. Trotini hava verið færri í tali og smærri í 2025 samanborið við í 2024. Orsøkin er millum annað at tey hava fingið lønarhækkan, rentulækkingar og harafturat er inflatiónin lækkað. Tað eru einans í tíðarskeiðinum 2021 til 2023, at reallønin tykist at hava verið lækkandi, sí mynd 1.3. Reallønin vaks eisini í fleiri ár á rað áðrenn 2021. Viðmerkjast skal, at peningastovnarnir her sipa til húsarhald, sum hava skuld í bankanum. Húsarhald sum ikki hava lán, eru torførari hjá bankunum at meta um.

### Kortnýtslan er økt í 2025

Lága vísitalið í konjunkturbarometrinum boðar frá ringum treysti hjá húsarhaldunum, men hetta sæst ikki aftur í kortnýtsluni, tí hon var væl størri í 2025 samanborið við í 2024, sí mynd 2.2. Í myndini er atlit tikið at prísvøkstri, tað vil siga, at størra kortnýtslan í 2025 ikki stavar frá øktum prísum. Økta kortnýtslan kann koma av, at lønirnar eru vaksnar meira enn inflatiónin í 2024 og 2025, og at rentan er lækkað, sum eigur at stuðla undir eini størri nýtslu.

**Mynd 2.2 Kortnýtsla hjá føroyingum***




* Talan er um kortnýtsluna hjá kundum hjá Betri Banka og Føroya Banka, sum fevnir um umleið 85% av samlaða kundaskaranum. Viðm.: Hagtølini eru deflateraði við brúkaraprístalinum. Kelda: Føroya Banki og Betri Banki.

### Bilasølan bert økt eitt vet í 2025

Bilasølan er ein konjunkturávísi, sum kann geva ábendingar um privatu nýtsluna. Tá ið fólk gerast varin við penganýtsluni, gongur tað serliga útyvir drúgvar vørur og stórar íløgur, so sum bilar. Myndin niðanfyri vísir samlaðu bilamongdina av persónbilum til privata nýtslu og árliga broytingina seinastu árini.[2]

Á mynd 2.3 sæst, at samlaða talið av persónbilum til privata nýtslu vaks ímillum 3% og 5% um árið í árunum 2017-2021. Í 2022 vaks samlaða talið av persónbilum stórt sæð ikki og nýggjastu tølini fyri 2025 vísa, at samlaða talið av bilum vaks 0,6%.

**Mynd 2.3: Bilamongd og árlig broyting**




Viðm.: Persónbilar til privata nýtslu.
Kelda: Akstovan.

Tað er serliga sølan av nýggjum persónbilum sum er lækkað í 2025 samanborið við 2024 (-19%), sí mynd 2.4. Sølan av brúktum bilum stendur so at siga í stað. Samanumtikið vísir bilasølan, at fólk aftra seg við at keypa nýggjar bilar og tað kann benda á varsemi hjá húsarhaldunum.

**Mynd 2.4 Bilasøla til privata nýtslu**
Árini 2021-2025




Viðm.: Bilasøla av persónbilum til privata nýtslu.
Kelda: Akstovan.

### Sethúsaprísirnir veksa framvegis

Sethúsaprísirnir eru øktir við 14% í Tórshavn í 2025 samanborið við 2024, og miðalprísurin var 4,4 mió. kr. í Tórshavn í 2025. Í sama tíðarskeiði eru sethúsaprísirnir hækkaðir í størru bygdunum við 12% og í smærru bygdunum við 4%, umframt í Sandoy/Suðuroy við 29%. Stóri vøksturin í Sandoy/Suðuroy skal tulkast við varsemi, tí miðalprísurin kann togast upp av einstøkum sølum eftirsum sølurnar eru fáar í hesum økjum, og eisini kunnu rættingar í hagtølunum fyrikoma eftirfylgjandi.

Í 2025 var miðalprísurin 2,6 mió. kr. í størri bygdunum og 2,1 mió. kr. í smærru bygdunum, og í Suðuroy og Sandoy samanlagt, var miðalprísurin 1,4 mió. kr. í 2025. Verður einans hugt eftir sethúsum seld í økjum á Eysturoynni kring tunnilsmunnan, var miðal sethúsaprísurin nærum 3,1 mió. kr. í 2025, vísa hagtøl hjá Føroya Banka (ikki víst í mynd 2.5).

**Mynd 2.5 Miðal sethúsaprísir, 2015 – 2025**




Kelda: Føroya Banki.

Miðalprísurin á íbúðum í Tórshavn er ikki øktur eins nógv, sum sethúsaprísurin. Prísurin vaks við 2% á íbúðum seldar í Tórshavn í 2025 samanborið við í 2024, og tað kemur millum annað av, at fleiri smáar íbúðir vórðu seldar í 2025 samanborið við í 2024.[3]

**Mynd 2.6 Miðal fermetraprísir, 2015 – 2025**




Kelda: Føroya Banki.

Miðalprisurin á íbúðum í Tórshavn var 3,1 mió. kr. í 2025. Tað hava verið seldar lutfalsliga nógvar íbúðir í Tórshavn samanborið við aðrastaðni í landinum. Umleið 70 íbúðir árliga hava verið seldar í árunum 2020 – 2024 í Tórshavn og í 2025 vóru 83 íbúður seldar í Havnini. Hinvegin eru tað skrásettar heilt fáar sølur av íbúðum í smærri bygdunum, eini 3 til 4 árliga síðani 2021. Søla av íbúðum í størru bygdunum hevur tikið dik á seg síðani 2022,

og umleið 17 til 18 íbúðir eru seldar árliga í árunum 2022 - 2025. Tað er ymiskt, hvussu stórar íbúðirnar eru; fermeturprísurin á íbúðunum seldar í Tórshavn í 2025 var um 41.400 kr., sí mynd 2.6. Fermetraprísurin á sethúsum í Tórshavn var til samanbering um 30.500 kr. í 2025, meðan fermetraprísurin á sethúsum var 18.900 kr. í størri bygdunum, 16.800 í smærri bygdunum og 9.500 kr. í Sandoy/Suðuroy. Í størri bygdunum var fermetraprísurin á seldu eigaraíbúðum 31.300 kr. í 2025 (ikki víst í mynd 2.6).

Sambært hagtølum hjá Landsbanka Føroya hækkaði bústaðarrentan í føroysku bankunum í tíðarskeiðinum frá á sumri 2022 til á sumri 2024 við nærum 2,5 prosentstigum, og hetta kann at hava tálmað vøksturin í sethúsaprísinum kring landið eitt vet í hesum tíðarskeiði. Størsti parturin av bústaðarskuldini hjá føroysku húsarhaldunum er í føroysku bankunum (11 mia. kr. ultimo 2025 ella 76%), meðan ein smærri partur er í donskum realkredittstovnum (3,4 mia. kr. ultimo 2025 ella 24%). Síðani á sumri 2024 er miðal bústaðarrentan í føroysku bankunum lækkað aftur (við nærum 1,3 prosentstigum), og hetta hevur viðvirkað til, at fleiri húsarhald kunnu vera við í kappingini um sethúsini.[4]

**Mynd 2.7 Miðalrenta á bústaðarskuld**




Viðm.: Miðalrenta á bústaðarskuld hjá føroyskum húsarhaldum í føroysku bankunum og donskum realkredittstovnum, jan. 2022 – des. 2025. Kelda: Landsbanki Føroya.

Miðalrentan í donsku realkredittstovnunum er hinvegin hækkað fram til miðskeiðis 2025 og er síðani lækkað aftur eitt vet. Miðalrentan á bústaðarlánum frá donsku realkredittstovnunum, ið er víst í myndini, er eitt miðal fyri rentuna hjá bæði teimum, ið hava stutt lán og teimum, ið hava lang lán. Stutt lán hava rentubindingartíðarskeið upp til 5 ár og rentan broytist hvørja ferð rentubindingartíðarskeiðið er av. Summi hava til dømis 1 ára rentubindingartíðarskeið, og hjá teimum broytist rentan tískil árliga. Langu lánini hava rentubindingartíðarskeið upp til 30 ár við eini rentu, sum er føst í øllum rentubindingartíðarskeiðinum. Bústaðarrentan í føroysku bankunum broytist hinvegin so hvørt, sum bankarnir hækka ella lækka rentuna. Miðalrentan á bústaðarskuld hjá føroysku húsarhaldunum í føroysku bankunum var 3,9% í desembur 2025 og 3,7% í donsku realkredittstovnunum, sí mynd 2.7.

**Mynd 2.8 Bústaðarbyrða**




Viðm.: Bústaðarbyrðan er roknað fyri eitt annuitetslán við afturgjaldstíð á 30 ár, og við miðalrentu vektað á rentudagar. Støddin á láninum svarar til 90% av miðal sethúsaprísinum í ávísa økinum, eginfíggingin er 10%. Hvør persónur í parlagnum tjenar eina miðalløn og børnini eru bæði undir 7 ár. Kelda: Betri Banki.

Lækkaða bústaðarrentan hevur elvt til, at bústaðarbyrðan er minkað í 2025, sí mynd 2.8. Bústaðarbyrðan vísir, hvussu stórur partur av tøku inntøkuni, ið eitt par við tveimum børnum, og har hvør persónur í parlagnum tjenar eina miðalløn í ávísa økinum, skal nýta til at afturgjalda sítt bústaðarlán. Bústaðarbyrðan lýsir, hvussu atkomuligt tað er hjá einum ungum pari at koma inn á bústaðarmarknaðin. Hagtøl hjá Betri Banka vísa, at bústaðarbyrðan er økt frá 18% til 38% í Tórshavn í tíðarskeiðinum 2015 – 2025. Bústaðarbyrðan var 42% í Tórshavn í 2024 og er lækkað til 38% í 2025 orsakað av renulækkingum. Bústaðarbyrðan var 24% í Eysturoynni og 20% í øllum landinum samlað sæð í 2025.

**Mynd 2.9 Sethúsaprísir og inntøkur 1997 – 2025**




Kelda: Sethúsaprísir: Betri Banki, inntøkur: Hagstova Føroya, útrokning: Landsbanki Føroya.

Í mynd 2.9 sæst, at sethúsprísirnir eru øktir munandi skjótari enn inntøkurnar síðani 2015. Stóri vøksturin í sethúsaprísinum er fyrst og fremst orsakaður av, at eftirspurningurin er munandi størri, enn útboðið.[5]

Bústaðartrotið er ein fløskuhálsur í føroyska búskapinum, og tað er neyðugt, at politiski myndugleikin tekur hesa avbjóðing í størsta álvara. Fíggjarpolitiska haldførið er vánaligt, og tað verður enn verri, um fólk ikki fara at støðast í Føroyum. Ein týðandi fyritreyt fyri tí er, at tað er møguligt at fáa eitt býli. Neyðugt er at veksa um útboðið av bústøðum, bæði tí fólkatalið veksur, og tí familjumynstrið broytist, so fólk í størri mun enn áður liva sum støk ella stakir uppihaldarar, ið krevur fleiri bústaðir. Tað eru í dag 27% sum liva støk, og hjá 25% av húskjunum eru bert 2 í húsarhaldinum.[6] Broytta familjumynstrið merkir, at tað er tørvur á, at verða bygdar fleiri smærri búeindir.

Kommunurnar eiga sín leiklut í bústaðartrotinum, tí tað eru tær, ið veita byggiloyvi og gera lendi byggiklár. Tí ræður um, at kommunurnar eru skjótar at geva byggiloyvi, tá søkt verður um hetta, og hava lendi byggiklár, so tað ikki seinkar byggingina. Kommunurnar kunnu fáa eitt ávíst innlit í demografisku broytingarnar við at hyggja at fólkatlasframrokningum, og harútfrá gera ætlanir fram í tíð. Eisini frættist um, at tilgongdin við at sundurmatrikulera er heldur drúgv, sum eisini kann vera viðvirkandi til, at útboðið av bústøðum er trekt.

Harafturat standa býli tóm í fleiri kommunum. Í teimum kommunum har eftirspurningurin eftir býli er stórur og útboðið av býlum er avmarkað, ber til at áseta bústaðarskyldu og at avmarka stutttíðarleigu. Summar kommunur hava ásett gjøld á tómar bústaðir, ið skal vera við til at fíggja útreiðslurnar, sum kommunan hevur til ymsu tænasturnar, ið hon veitir sethúsaeigarum. Tað kann vera við til at økja um útboðið av býlum, um summi fara at leiga tóma bústaðin út fyri at fáa dekkað útreiðslurnar til tænastugjaldið frá kommununum ella møguliga selja. Onnur tiltøk kunnu vera at áseta fastognarskatt, tí tað kann vera við til at avmarka eftirspurningin eftir bústøðum og gera prísgongdina meira støðuga. Ein hóskandi fastognarskattur hevði avmarkað áhugan í at brúka fastogn sum íløguaktiv, tá tað hevði javnsett íløgur í fastogn við partabrøv og onnur virðisbrøv. Harafturat kann rentustuðulin stigvíst takast burtur.

## 03

# Vinnan

Kanningin hjá Hagstovu Føroya um treystið hjá vinnuni, gevur eina ábending um búskaparligu støðuna í løtuni og útlitini fyri búskapin í stutta sýninum. Í konjunkturbarometrinum verður vinnan býtt upp í byggivinnu, handilsvinnu, tænastuvinnu og tilfeingisvinnu & annar ídnaður. Hesar hava ávirkan á millum annað arbeiðsmarknaðin, útflutningin og gongdina í búskapinum sum heild.

### Byggivinnan væntar lægri arbeiðstørv komandi árið

Byggivinnan fylgir vanliga konjunkturgongdini í búskapinum og er tengd at íløguhuganum hjá bæði almennum og privatum aktørum. Ávísin hjá byggivinnuni er fjórða hálvárið á rað fallin. Ávísin var 2 í januar 2026, og ávísin hevur ligið undir langtíðarmiðalinum síðani januar 2025.

**Mynd 3.1 Byggivinnan ávísi jan. 2020 – jan. 2026**




Kelda: Hagstova Føroya

Færri byggifyritøkur, enn seinast, siga í januar 2026, at veður ella mangul á arbeiðsmegi er ein avmarking fyri framleiðsluna samanborið við í juni 2025, men fleiri byggifyritøkur meta, at manglandi eftirspurningur er ein avmarking. Eisini væntar byggivinnan, at arbeiðstørvurin fer at lækka komandi árið. Byggivinnan sigur, at bíleggingarnar eru sum vanligt, men hon hevur sambært kanningini í januar 2026 tryggjað arbeiði í 10 mánaðir fram, samanborið við seinastu kanning frá juni 2025, har byggivinnan hevði tryggjað arbeiði í 12 mánaðir fram. Til samanbering var tað í 2023 tryggjað arbeiði í hálvtannað ár fram í byggivinnuni. Sambært umboð fyri byggivinnuna, er byggivinnan framvegis bjartskygd, og ferðin í byggivinnuni er vorðin eitt sindur meira vanlig samanborið við, tá ið nógvar stórar verkætlanir hava verið í gongd í senn.

### Handilsvinnan væntar hægri sølu komandi árið

Ávísin hjá handilsvinnuni er vaksin nógv í januar 2026 samanborið við í kanningini frá juni 2025; hann er 33 og liggur nú omanfyri langtíðar miðalið. Handilsvinnan væntar hægri sølu komandi árið og av tí sama bæði økt vørukeyp og øktan arbeiðstørv. Ávísin hjá

handilsvinnuni gevur ábendingar um væntanir til eftirspurningin frá eitt nú húsarhaldunum.

**Mynd 3.2 Handilsvinnan ávísi jan. 2020 – jan. 2026**




Kelda: Hagstova Føroya

### Tænastuvinnurnar vænta lægri eftirspurning komandi árið

Tænastuvinnan fevnir um fleiri vinnugreinar; eitt nú flutningsfyritøkur, gisti- og matstovuvirksemi og aðrar tænastur, sum eitt nú grannskoðanarfyritøkur og advokatskrivstovur. Ávísin hjá tænastuvinnunum er óbroyttur í januar 2026 samanborið við kanningina frá juni 2025. Tænastuvinnan boðar frá, at umsetningurin er øktur seinasta árið, men væntar tó ikki, at umsetningurin fer at veksa komandi árið. Tænastuvinnan hevur upplivað øktan eftirspurning seinasta árið, men metir, at eftirspurningurin fer at lækka aftur í komandi árinum, og arbeiðstørvurin fer tí eisini at minka komandi árið.

**Mynd 3.3 Tænastuvinnan ávísi jan. 2020 – jan. 2026**




Kelda: Hagstova Føroya

### Tilfeingisvinnan væntar hægri prísir

Ávísin fyri treystið hjá tilfeingisvinnunum er hækkaður eitt vet í januar 2026 samanborið við kanningina frá juni 2025. Ávísin er 0 í januar 2026 samanborið við -1 í juni 2025, ið møguliga kemur av, at fiskiskapurin í Føroyum var betri í 2025 samanborið við í 2024. Hinvegin er kvotan av bæði makreli og svartkjafti lækkað munandi. Tilfeingisvinnan svarar, at gongdin í seinastuni er batnað; tilfeingisvinnan hevur væntanir um hægri prísir, men

boðar frá lægri eftirspurningi úr útlondum. Tó sigur tilfeingisvinnan seg hava fingið størri marknaðarlut á útlendska marknaðinum.

**Mynd 3.4 Tilfeingisvinnan og annars ídnaður ávísi jan. 2020 – jan. 2026**




Kelda: Hagstova Føroya

# Útlendsk arbeiðsmegi

### Ein stórur partur av starvsfólkunum í vinnuni eru útlendingar

Meginparturin av útlendingunum, ið eru komnir til Føroya seinastu árini, eru fólk í arbeiðsførum aldri og tey eru áleið 8% av arbeiðsmegini í dag, ið svarar til stívliga 2.400 starvsfólk. Størsti parturin av útlendsku starvsfólkunum starvast innan framleiðsluvinnuna; í desembur 2025 arbeiddu 31% av útlendingunum í framleiðsluvinnuni, sí mynd 3.5. Framleiðsluvinnan er millum annað matvøruídnaður (flakavirkir).

**Mynd 3.5: Lutfall av útlendskum starvsfólki í ymsum vinnugreinum, desembur 2025**




Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Í sama tíðarskeiði arbeiddu 12% av útlendingunum í gisti- og matstovuvinnuni, 11% í byggivinnuni, 10% í heil- og smásøluvinnuni, 8% við fiskiveiði og 7% innan umsitingarligar o.l. tænastuveitingar (sum til dømis eru ferðaskrivstovur) og 6% innan almenna umsiting.

Síðani snarskipanin (fast track skipanin) varð sett í verk í novembur 2021, er útlendska arbeiðsmegin vaksin 60% (við 871 persónum) samanborið við eini tilgongd á 1% av føroyingum (400 persónar) í sama tíðarskeiði, sí mynd 3.6.

**Mynd 3.6 Tilgongd av starvsfólkum í Føroyum, jan. 2015 – des. 2025**




Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Í desembur 2025 var vøksturin av útlendskari arbeiðsmegi 8% samanborið við desembur 2024, sí mynd 3.7. Talið av útlendskari arbeiðsmegi veksur tí støðugt. Tilgongdin av føroyskari arbeiðsmegi er lítil og positiv, hóast tað samstundis hevur verið nettofráflyting av føroyingum. Vøksturin í talinum av føroyskum starvsfólki kann millum annað stava frá hægri arbeiðsvirkni, økta pensjónsaldrinum, so summi halda á at arbeiða efter pensjónsaldur, ella at fleiri ung eru farin at arbeiða.

**Mynd 3.7: Tal av útlendskum starvsfólki og vøkstur samanborið við sama mánað árið fyri jan. 2021 – des. 2025**




Viðm.: Vøkstur í mun til sama mánað árið fyri av málda starvsfólkatalinum. Starvsfólkatalið er 12- mánaðar glíðandi miðal. Útlendingar eru í myndini eyðmerktir sum starvsfólk, ið hava annan enn danskan ríkisborgaraskap. Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Í desembur 2025 var 41% av útlendsku arbeiðsmegini úr Evropa, 43% úr Asia, 11% úr Afrika og 5% úr Amerika. Í mynd 3.8 sæst, at útlendsku íbúgvarnir í størsta mun komu úr Asia og Evropa annars (Evropa uttan Norðurlond) í 2025 (myrkagráu stabbarnir). Myndin vísir harafturat, at tilflytingin av útlendingum úr Asia og Evropa annars var munandi størri í 2025, enn í 2018 (ljósagráu stabbarnar).

Ljósa- og myrkareyðu stabbarnir vísa, hvussu nógvir útlendingar vóru í landinum sum høvdu bústaðartilknýti. Hevur man seinastu 10 árini búð í Føroyum í 7 ár ella í helvtina av sínum lívi, hevur man bústaðartilknýti. Myrkareyðu stabbarnir vísa, at tað vóru fleiri útlendingar sum høvdu bústaðartilknýti í 2025 enn í 2018 (ljósareyðu stabbarnir) úr Asia, Afrika og Evropa annars (evropeisk lond uttan norðurlondini). Hetta ger seg hinvegin ikki galdandi fyri norðurlond og kann merkja, at arbeiðsmegi úr norðurlondum ikki í størri mun í 2025 enn í 2018 vóru verandi í Føroyum (norðurlond eru ikki víst í myndini).

**Mynd 3.8 Útlendingar við og uttan bústaðartilknýti í 2018 og 2025**




Viðm.: Íbúgvar í aldrinum 16-66 ár. Ein persónur hevur bústaðartilknýti til Føroya, um hann annaðhvørt hevur búð 7 av 10 samanhangandi árum ella helvtina av lívinum í Føroyum. Ein útlendingur, er ein sum ikki hevur føroyskan/danskan ríkisborgaraskap. Kelda: Hagstova Føroya.

04

# Uttanlandshandil

**Tað er framvegis avlop á handilsjavnanum**

Myndin niðanfyri vísir gongdina í inn- og útflutninginum av vørum, umframt vøruhandilsjavnan við og uttan skip og onnur flutningstól. Yvirskipað hevur verið avlop á handilsjavnanum seinastu 15 árini við einkultum undantøkum, eitt nú í 2020, sí mynd 4.1 til vinstru. Í 2025 var avlopið á handilsjavnanum 2,6 mia. kr., samanborið við slakar 2 mia. kr. í 2024, og tað var áleið 3 mia. kr., um innflutningurin av skipum og øðrum stórum flutningstólum ikki verður tikin við.

Handilsjavnin vísir munin millum útflutning og innflutning. Orsøkin til, at tað eisini verður hugt at handilsavnanum, tá skip og onnur flutningstól eru frároknaði er, at talan oftast eru um stórar innfluttar íløgur, ið kunnu sveiggja nógv frá einum árið til annað. Í myndini sæst hetta millum annað í 2022 og 2023, har stórar íløgur vóru gjørdar í skip.

**Mynd 4.1 Inn- og útflutningur (vinstra) og handilsjavni (høgra) 2020-2025**




Viðm.: Myndin til vinstru vísir inn- og útflutningin uttan skip og onnur flutningstól. Myndin til vinstru er 12 mánaðar leypandi samanlegging (frá januar 2020 til desembur 2025), meðan myndin til høgru er 12-mánaðar samanlegging frá desembur til januar hvørt ár. Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar

Innflutningurin er vaksin við áleið 700 mió kr. í 2025 samanborið við 2024, sí mynd 4.1 til høgru. Størsta økingin er í innflutningin av djóra- og plantuoljum til framleiðslu av fiskafóðri, meðan innflutningsvirðið av skipum og matvøru eisini er vaksið nakað.[7] Samstundis er útflutningurin vaksin við áleið 1,4 mia. kr. í 2025 ella við 11%.

At tað í 2024 varð útflutt fyri størri virðir, enn tað varð innflutt fyri, er við til at geva eitt avlop á rakstrarviðurskifti gjaldsjavnans í 2024 (gjaldsjavnin er uppgjørdur til og við 2024). Rakstraruppgerðin lýsir viðurskiftini millum Føroyar og útlond við millum annað at telja saman inntøkur frá útflutningi og útreiðslur av innflutningi, lønarinntøkur hjá føroyingum,

sum arbeiða hjá útlendskum arbeiðsgevarum, umframt lønarútreiðslur hjá føroyskum arbeiðsgevarum goldnar til útlendingar, sum búgva uttanlands. Í 2024 var avlopið á rakstrarviðurskiftum gjaldsjavnans 1,9 mia. kr., og tað er ein vøkstur á 600 mió. kr. samanborið við avlopið í 2023 (sí fylgiskjal 1 um gjaldsjavnan).

**Stórar mongdar- og prísbroytingar ávirka fiskavøruútflutningin**

Samlaða útflutningsvirðið av vørum var 13,6 mia. kr. í 2025. Alivinnan stendur fyri nærum helvtini av vøruútflutninginum. Í 2025 var samlaða útflutningsvirðið á laksi 6,2 mia. kr., ella 45% av samlaða útflutningsvirðinum, sí mynd 4.2.

**Mynd 4.2 Fiskavøruútflutningur jan. 2021 - des. 2025**




Viðm.: 12-mánaðar leypandi samanlegging. Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Fyri pelagiska fiskiskapin Í 2025 minkar mongdin í útflutninginum av norðhavssild við 12%. Hóast kvotan av makreli lækkaði frá 2024 til 2025, hevur Føroyar útflutt áleið 10% meira í nøgd, og tað skyldast at fleiri útlendsk skip hava avreitt makrel í Føroyum.

Útlitini fyri pelagiska fiskiskapin í 2026 eru merkt av óvissu. Fyri 2026 samdust strandarlondini um ein niðurskurð á heildarkvotuni av makreli á 48% og svartkjafti á 40%, meðan kvotan av sild veksur við 33%. Við kvotuniðurskurðinum á makreli, er ivasamt um útflutningsvirðið fyri pelagisku veiðuna heldur støðið í 2026 samanborið við 2025, hóast útlit eru fyri betri prísi fyri pelagiska fiskiskapin í 2026.

Avreiðingarvirðið av toski í Barentshavinum fall í 2025, men varð meira enn uppvigað av, at fiskiskapurin eftir toski í føroyskum sjóøki tvífaldaðist, har avreiðingarvirðið fór úr 100 mió. kr til 200 mió. kr. Á mynd 4.3 sæst, at gongdin í eindarprísinum á toski hevur verið vaksandi síðani byrjanina av 2024.[8] Miðal eindarprísurin av toski í 2025 hevur verið góðar 71 kr./kg. samanborið við slakar 55 kr./kg. í 2024. Hetta sæst aftur í útflutningsvirðinum á botnfiski (hýsu, toski og upsa), ið er økt við 23% í 2025 samanborið við 2024, sí mynd 4.2.

Meðan toskakvotan í Barentshavnium lækkar við áleið 18% í 2026 samanborið við 2025, eru útlitini fyri toskaveiðu í føroyskum sjóøki góð. Sambært umboðum fyri vinnuna væntast fiskiskapurin eftir toski á landgrunninum at vera óbroyttur í 2026, umframt, at prísurin heldur støðið frá 2025.

**Mynd 4.3 Eindarprísurin á laksi, makreli og toski jan. 2021 - des. 2025**




Viðm.: Útflutningsvirðið býtt við útfluttu mongdini í sama tíðarskeiði. Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Eisini eindarprísurin á makreli er vaksin seinasta árið; miðalprísurin var áleið 22 kr./kg. í 2025 samanborið við 15 kr./kg. í 2024 – ein vøkstur á nærum 50%. Á sumri 2025 væntaði vinnan, at makrelprísurin fór at fella í seinnu ársválvu, tí meginparturin av makrelinum longu varð fiskaður í bretskum sjógvi, har góðskan er best. Prísurin vísti seg tó at halda fram at vaksa, og harafturat var makrelútflutningurin størri í nøgdum, enn væntað. Útlitini fyri pelagiska fiskaríið í 2026 er, at prísurin á sild heldur sær, hóast nøgdin veksur. Fyri makrelin verður mett, at prísurin hækkar, tí nøgdirnar fella nógv.

### Tøkan av laksi økt, meðan prísurin er fallin

Altjóða útboðið av hágóðsku (superior) laksi er vaksið nógv í 2025. Høvðusorsøkin er meiri effektiv koppseting móti vetrarsári í framleiðsluni í Noreg, sum stendur fyri áleið helvtini av heimsútboðnum. Hetta elvdi til stóran vøkstur í altjóða útboðum av laksi, ið gav eitt stórt prísfall í 2025, sí mynd 4.3. Fyri árið 2025 fall eindarprísurin við 18% samanborið við 2024.

Mynd 4.4 vísir útfluttu nøgdirnar av laksi, sum 12-mánaðar leypandi samanlegging og útflutningsvirðið av laksi. Hóast stórt prísfall, vaks útflutningsvirðið á laksi í 2025, úr áleið 5,8 mia. kr. í 2024 til 6,2 mia. kr. í 2005. Hetta kemur av, at útflutta nøgdin er økt við sløkum 25 t. tons í 2025, ið svarar til ein vøkstur á 28%, samanborið við útfluttu nøgdina í 2024, sí mynd 4.4.

**Mynd 4.4 Útflutt nøgd og virði á laksi jan. 2020 - nov. 2025**




Viðm.: 12-mánaðar leypandi samanlegging. Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Fyri alivinnuna eru útlit fyri vøkstri í 2026. Umboð frá vinnuni meta, at tøkunøgdin og prísurin fer at vaksa við áleið 10% í 2026. Prísurin á laksi fall fyribils í januar 2026, men er síðani øktur, og væntast at gerast hægri í 2026 samanborið við 2025 sambært metingum av forward prísum. Hóast prísurin ikki kann væntast at røkka sama støði sum í 2024, merkir vøkstur í bæði prísi og nøgd, at útflutningsvirðið kann væntast at økjast í 2026.

## Botnfiskiskapurin

Botnfiskiskapurin eydnaðist væl í 2025 samanborið við undanfarin ár; útflutningsvirðið av toski, hýsu og upsa er økt við omanfyri 600 mió. kr. Útflutningsvirðið á toski er økt serliga vegna eindarpríshækkingar.[9] Útflutningsvirðið á hýsu og upsa er eisini økt vegna eindarpríshækkingar, umframt at útfluttu nøgdirnar eru hækkaðar. Eindarprísirnir á hýsu og upsa eru hækkaður enn meira, enn fyri toskin. Ein av orsøkunum til, at hýsu- og upsaeindarprísirnir eru hækkaðir so nógv, er allarhelst, at tá ið toskurin hækkar nógv í prísi, flytur eftirspurningurin seg yvir til onnur fiskasløg sum líkjast.

Mynd 4.5 vísur stovnsstøddina á toskinum á landgrunninum, veiðipartin av stovninum og veiðitrýstið. Myndin vísir, at veiðitrýstið økist, tá ið toskastovnurin veksur. Toskastovnurin var væl fyri í 2018 og tá øktist veiðitrýstið nógv í 2018 og 2019. Tað er nú aftur líkt til, at toskastovnurin er eitt vet betur fyri, umframt at marknaðarprísurin er høgur, og nú tykist veiðitrýstið aftur at økjast. Veiðitrýstið er vaksið úr 17% í 2024 til nærum 31% í 2025.

Hóast toskastovnurin sær út til at vera í betring, er hann væl minni, enn hann plagdi at vera. Í seinni helvt av 1970 var veiðan av toski upp móti 40.000 tonsum, eins og hon var miðskeiðis í 1980'unum og 1990'unum. Miðal veiðan síðani 2004 hevur ligið á umleið 10.000 tons. Tað mesta í hesum tíðarskeiði er 20.000 tons í 2018. Sambært stovnsmetingum hjá Havstovuni, hava botnfiskastovnarnir á Landgrunninum verið illa fyri

í eitt longri tíðarskeið og toskastovnurin hevur verið undir søguliga lágmarkinum síðani 2004.

**Mynd 4.5 Toskur á føroyska landgrunninum: stovnsstødd, veiða og veiðitrýst**




Kelda: Havstovan.

Føroyar stýrir veiðitrýstinum við fiskidøgum. Tað vil siga, at skip fáa tillutað eitt ávíst tal av fiskidøgum og kunnu fiska so nógv ið til ber hjá skipinum hesar fiskidagar. Fyrimunurin við hesi skipan er, at alt kemur til lands. Vansin við skipanini er, at ein ikki fær stýrt veiðitrýstinum eftir ávísum fiskasløgum. Til dømis er vandi fyri, at tá ið prísurin á toski er so mikið høgur sum í løtuni, fara skipini einans leggja seg eftir at fiska tosk. Umboð fyri reiðararnar hevur víst á, at hann ikki væntar, at øll hýsukvotan verður fiskað, sum er 19.653 tons[10] í ár, tí skipini fyrst og fremst royna eftir toski orsakað av høga toskaprísinum. Við hesum gerst veiðitrýstið eftir toski ov høgt.

Serliga toska-, hýsu-, og eisini í ein ávísan mun upsastovnarnir undir Føroyum, eru staðbundnir stovnar, og tað sum hvørt ár verður tikið úr stovnunum, hevur ávirkan á støddina á stovnunum. Tí hevur veiðitrýstið týdning fyri støddina á tí varandi ískoyti, sum fiskastovnarnir kunnu geva føroyska búskapinum. Endamálið við at avmarka veiðitrýstið er fyrst og fremst, at fiskastovnarnir skulu geva størst møguligt búskaparligt avkast til samfelagið í langa høpinum.

Stóra talið av óbrúktum fiskidøgum, er eitt tekin um, at skip ikki mangla fiskidagar, og at tað so at siga altíð er møguleiki fyri at fara út at fiska meira, sí mynd 4.6. Tí kann skipanin sum botnfiskaflotin verður stýrdur við, verða lýst sum frítt fiskarí, ið hvørki er skilagott lívfrøðiliga ella búskaparliga. Lívfrøðiligu umstøðurnar kunnu ikki beinleiðis stýrast, men hvussu nógvur fiskur verður tikin úr stovninum á hvørjum ári, kann og eigur at verða stýrt. Tað er meira skynsamt at hava kvotur, heldur enn fiskidagar, so mark kann setast fyri nøgdina, ið verður fiskað. Lond, sum vit samanbera okkum við, brúka kvotur at stýra veiðitrýstinum og hetta er ikki ókunnugt fyri føroysku reiðaríini og føroysku skipararnir, tí eitt nú bæði fiskiskapurin eftir pelagisku fiskasløgunum og fiskiskapurin í Barentshavinum er

stýrdur við kvotum. Fiskiskapurin, ið verður stýrdur við kvotum, gevur stór yvirskot, meðan fiskiskapur, ið verður stýrdur eftir fiskidøgum, gevur hall ella smá yvirskot.[11]

**Mynd 4.6 Brúktir og tillutaðir fiskidagar hjá bólki 2-4**




Kelda: Havstovan.

05

# Almenna fíggjarstøðan og útlit

### Úrslitini vísa stór hall hóast góðar búskaparligar tíðir

Fyribils uppgerðin fyri 2025 vísir roknskaparúrslitið hjá landskassanum (RLÚ I) eitt hall á 50 mió. kr., sí Mynd 5.1.[12] Tað er minni samanborið við upprunaligu játtanina fyri 2025, sum var 147 mió. kr. íroknað eykajáttanum.

Í heyst metti Búskaparráðið saman við Fíggjarmálaráðnum, at úrslitið á fíggjarlógini fyri 2025 fór at vera eitt hall á 390 mió. kr. Fyribils metingin er tó, at hallið verður 50 mió. kr. í 2025. Tað er væl betri enn mett í heyst, og tað er gott. Høvuðsorsøkin er at raksturin er betraður við umleið 170 mió. kr. Harafturat var millum annað eykajáttanin í 2025 27 mió. kr. og ikki 50 mió. kr., sum mett var í heyst. Somuleiðis eru bert brúktar 50 mió. kr. av støðlingunum,[13] og ikki 160 mió kr., sum áður mett. Hartil var minni inntøkan av tøkugjaldinum til alivinnuna einans 75 mió. kr. og ikki 108 mió. kr., sum mett varð í heyst.

**Mynd 5.1 Landskassaúrslitið 2023-2027**




Viðm.: Landskassaúrslitið, endaligt RLÚ 1 úrslit (vanligir postar). 2020-2024 er roknskapur, 2025 er roknskapur fram til 25. februar 2026, bókingar kunnu fyrikoma eftir hesa dagfesting, ið kunnu broyta endaliga úrslitið. 2026 og 2027 eru metingar.
Kelda: Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið.

Úrslitið fyri 2026 byggir á fíggjarlógina fyri 2026, ið hevur eitt hall á 268 mió. kr. Í samráð við Fíggjarmálaráðið metir Búskaparráðið, at 50 mió. kr. í eykajáttanum koma í afturat. Støðlingarnar (framflutt játtan frá 2025 til 2026), eru mettar av vera 280 mió. kr. Verður hugt at tíðarskeiðnum 2016 til 2024, so er ymiskt, hvussu nógv er brúkt av støðlingunum hvørt árið, men í miðal er upphæddin um 50 mió. kr. Tað gevur eitt samlað hall fyri 2026 á 368 mió. kr.

Í roknskaparskipan landsins, liggur eisini ein ætlan inni fyri 2027, ið vísir eitt hall á 197 mió. kr. Verður sama mannagongd brúkt sum fyri 2026, tað vil siga 50 mió. kr. í eykajáttanum og 50 mió. kr. í støðlingum, so verður undirskotið 297 mió. kr. Sambært játtanarkørmunum fyri 2026, er ætlanin at gera sparitiltøk á 90 mió. kr. í 2027 og 35 mió. kr. afturat hvørt eftirfylgjandi ár fram til 2030. Í so fall verður hallið í 2027 207 mió. kr., sí mynd 5,1.

Tað er positivt, at landsstýrið ætlar at gera tiltøk fyri at fáa betri úrslit í landskassanum. Tað er tó neyðugt at gera skilagóð tiltøk, sum viðføra sparingar í rakstrinum. Tað er ikki skynsamt at brúka "plenuklipparan" fyri at spara á landsins útreiðslum, tað vil siga, at almennu nýtsluútreiðslurnar verða allar skornar yvir ein kamb. Hesin háttur at spara tekur ikki atlit at, at summar almennar tænastur og veitingar eru meira týðandi, enn aðrar. Heldur ikki tekur hesin hátturin hædd fyri, at almennu tænasturnar eru ymiskar í mun til møguleikarnar fyri at gagnnýta eitt nú tøkniliga menning til at bøta um effektivitetin. Tá ið spart verður yvir ein kamb, kann vandi vera fyri, at summar uppgávur verða tiknar burtur, sum annars eru við til at skapa sparingar í langa høpinum, eitt nú fyribyrgjandi átøk. Summir stovnar og skipanir eru longu so mikið effektivar, at góðskan minkar, um spart verður á hesum økjum, meðan onnur øki hava betri møguleikar fyri at gerast meira effektiv.

Hall frá 2023 til 2027 (ikki íroknað støðlingar, og ætlanartøl fyri 2026 og 2027) hava í miðal verið 220 mió kr. Úrslitið í 2024 gjørdist eitt hall á 170 mió. kr. Í 2024 varð ein teknisk broyting framd, og um ikki tekniska broytingin verður tald við, hevði úrslitið verið nærri 400 mió. kr. í 2024. Tekniska broytingin er, at landsstýrið í 2024 valdi at javna ein minni part av tilfeingisinntøkunum yvir Búskapargrunnin. Í staðin fyri at seta 250 mió. kr. frá fiskivinnuni og 150 mió. kr. frá alivinnuni beint inn á fíggjarlógina og rest í Búskapargrunnin at javnast, broyttist reglan til at vera tann, at 350 mió. kr. frá fiskivinnuni og 250 mió. kr. frá alivinnuni skulu beint inn á fíggjarlógina. Hetta betraði úrslitið við 200 mió. kr. frá 2024 og frameftir. Um støddin av hallinum verður sett í mun til BTÚ, var hallið í 2023 1,5% av BTÚ, 0,6% av BTÚ í 2024 og 0,2% av metta BTÚ í 2025.

### Eisini kommunurnar samlað hava hall

Kommunukassarnir samanlagt hava eisini hall og hava havt tað síðani 2018. Hallið í 2024 var 327 mió. kr. sambært roknskapinum hjá kommununum í Búskaparskipan Landsins. Sambært fíggjarætlanum fyri 2025, er hall. Tað er ilt at meta um, hvat roknskaparliga úrslitið í 2025 verður, tí tað verður enn bókað á 2025.

**Mynd 5.2 Úrslitið á kommunalu kassunum 2015-2024**




Kelda: Landsbanki Føroya, Gjaldstovan og egnar útrokningar.

Verður hugt at hallinum hjá landi og kommunum í 2024, sum er endaligt, so eru tað tilsamans nærum 500 mió. kr. og svarar tað til 1,8% av BTÚ. At tað er hall hjá bæði landskassa og kommunum í hákonjunkturi merkir, at almennu myndugleikarnir eru við til at stimbra búskapin í góðum tíðum.

### Stýrið útreiðslunum

Royndirnar í Føroyum vísa, at tað er torført hjá politisku skipanini at standa ímóti og ikki at økja um nýtsluna í góðum tíðum, tí nógv verður brúkt, tá ið inntøkurnar hava verið stórar og øvugt. Tað sæst millum annað við, at landskassin og kommunukassarnir hava stór undirskot í bestu tíðum. At útreiðslurnar ikki vera stýrdar betri, hevur negativar fylgjur við sær fyri allar geirar í samfelagnum; tað vil siga bæði vinnu, land, kommunur og húsarhaldini.

Um almennu útreiðslurnar til rakstur og íløgur verða øktar í góðum tíðum, verður búskapurin yvirhitaður. Hetta merkir, at tá ið ov nógvar íløgur verða gjørdar í senn av vinnu, landi og kommunum, og tað elvir til, at prísurin fyri byggiarbeiði verður munandi hægri fyri øll sum gera byggiarbeiði. Alt samfelagið rindar fyri yvirhitingina. Vinnan rindar ov høgar prísir og skattaborgarin rindar ov nógv, bæði tí byggiarbeiði hjá tí almenna gerast dýrari enn neyðugt, og tí húsarhaldini gjalda ov nógv, tí sethúsabygging verður ov dýrt.

Tá ið almenni búskapurin ikki verður styrktur í góðum tíðum, kann tað gerast neyðugt at tátta í, tá ið búskapurin vendir. Tað er skilagott at spara upp í góðum tíðum við at hava yvirskot í almennu kassunum, til at kunna stimbra búskapin við tá ið tað gongur verri, tí harvið verður tryggjað, at ein niðurgongd ikki gerst størri enn neyðugt. Búskapurin verður stimbraður við at minka skattir og avgjøld og við at økja almennu nýtsluna.

### Setið í verk nýskipanir og sparingar

Neyðugt er, at politiski myndugleikin fremur umfatandi nýskipanir og sparingar (rationaliseringar) innan almenna raksturin. Frágreiðingin hjá Búskaparráðnum um haldførið (2024) vísti, at førdi fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur og at núlivandi ættarlið leggja ófíggjaðar rokningar eftir sær til komandi ættarlið. Undirskotini seinastu árini í bestu búskaparligu tíðum fer einans at vaksa í framtíðini við førda fíggjarpolitikkinum. Vísandi til haldførisgreiningina, fara áleið 2 mia. kr. at tátta í árliga, um eingin átøk verða gjørd.[14]

Hóast hesin boðskapur er endurtikin fleiri ferðir, og hóast øll síggja hallini í almennu kassunum í fleiri ár á rað, so er enn ikki komið nakað boð frá nøkrum politikara uppá, hvussu man ætlar at fáa búskapin at hanga saman búskaparliga nú og í framtíðini. Hetta er bráðneyðugt at fáa skil á, men politiski myndugleikin er sera trekur at gera tær nýskipanir og sparingar, ið skula til. Eitt nú eru ætlanir um at fara undur at bora ein tunnil til Suðuroyar – áðrenn loysn er funnin á avbjóðingini at tryggja fíggjarpolitiska haldførið. Tað er ábyrgdarleyst. Tað hava verið uppskot um at hækka pensjónsaldurin og uppskot um fíggjarpolitisk regluverk. Men enn er einki samtykt og harafturat er ikki nóg gott, bert at koma við nøkrum einkultum uppskotum, sum eru við til at betra um haldførið, men ikki

loysir allan trupulleikan. Neyðugt er at gera eina ítøkiliga ætlan fyri, hvussu málið um fíggjarpolitiskt haldføri verður nátt. Henda risa avbjóðing eigur at vera tikin í álvara.

Tað tykist sum um politikarar ikki tora at fremja sparingar ella nýskipanir. Møguliga er tað tí tað merkir, at tað kemur at ganga út yvir onkran, og so kunnu atkvøður vera í váða. Men taka politisku myndugleikarnar ikki neyðugu avgerðirnar at reka samfelagið skilabetri, verða tað í síðsta enda kreditorarnir sum gera tað fyri okkum, júst sum í kreppuni fyrst í nítiárinum. Politikararnir eiga at fremja nýskipanir, sum effektivisera almenna raksturin og minka um almennu rakstrarútreiðslurnar bæði í løtuni og frameftir. Fyri at fremja neyðugu nýskipanir og sparingar, er í nøkrum føri neyðugt at fremja íløgur, so sparingin letur seg gera. Til dømis íløgur í størri ellisheim. Hesar íløgur eiga at hava fremstu raðfesting. Eisini eigur at vera hugt at inntøkunum. Niðanfyri eru nøkur dømi um møguligar nýskipanir og sparingar.

### Leggið kommunur saman

Tað eru 29 kommunur í Føroyum og "bert" 55.000 fólk. Til dømis hevur Grønland, við umleið sama fólkatal sum Føroyar, bert 5 kommunur. Danmark hevur 98 kommunur, har miðal íbúgvaratalið er 55.000 fólk. Bæði eldra- og dagstovnaøkið, sum eru stór og krevjandi økir, liggja hjá kommununum. Kommunurnar eru sera ymiskar, bæði í stødd, aldursamanseting av íbúgvunum og inntøkugrundarlagi. Neyðugt er hjá politiska myndugleikanum at endurskoða skipanina millum land og kommunur, tí allar kommunur fara helst ikki at megna trýstið á vælferðartænasturnar. Skilagott hevði verið at lækka talið á kommunum, soleiðis at umsitingin í hvørjari kommunu verður sterkari og fíggjarliga rásarúmið til at taka sær av dagstovna- og eldraøkinum batnar. Annar møguleiki er at endurskoða, um dagstovnaøkið og/ella eldraøkið eigur at liggja hjá kommunum. Sí eisini temafrágreiðingina hjá Búskaparráðnum á heystið 2025.

### Fái dupultfunktiónir burtur

Almannaverkið og kommunur loysa í nøkrum føri somu uppgávur. Legg somu uppgávu á eitt stað, antin hjá landinum ella kommunum, tí búskapurin er ov lítil til at hava somu funktiónir fleiri staðni. Eitt nú eru trý sjúkrahús í Føroyum til 55.000 fólk, og tí er neyðugt at taka burtur óneyðugar dupultfunktiónir á hesum øki. Annað minni dømi er hjálpartól, sum bæði liggur hjá almannaverkinum og hjá sjúkrahúsinum.

### Nógvir smábýttir stovnar

Í Føroyum eru nógvir smáir stovnar. Føroyar hevur 39 fólkaskúlar, har nærum ein helvt (15 skúlar) hava færri enn 40 næmingar. Nógvir smáir stovnar eru í almannaverkinum, heili 11 stovnar við 1-2 búfólkum og 38 stovnar við færri enn 10 búfólkum. Tað er bara ein stovnur undir almannaverkinum sum hevur fleiri enn 30 búfólk. Á eldraøkinum, eru tilsamans 30 stovnar. 18 av hesum stovnum hava færri enn 20 búfólk. Smáir stovnar gera tað væl truplari at hava skynsaman rakstur á stovnunum og harafturat krevja smáir stovnar eitt hægri starvsfólkatal fyri hvørt búfólk samanborið við, um stovnarnir vóru størri. Hetta er serliga galdandi, tá ið stovnarnir hava tørv á samdøgursmanning. Longu í dag eru avbjóðingar at manna øll størv á eldra- og almennaøkinum. Eisini eru nógvir smábýttir

stovnar innan almenna fyristing og tænastu. Tað eru tilsamans 73 landsstovnar. 36 av hesum hava færri enn 20 ársverk og 50 stovnar hava færri enn 40 ársverk.

### Veks um inntøkurnar

Fyri at betra um fíggjarliga úrslitið eru sjálvandi eisini møguleikar at betra um inntøkurnar. Til ber at økja um tilfeingisinntøkurnar frá fiskivinnuni og alivinnuni. Annað dømi er at økja partafelagsskattin, sum er 18% í Føroyum, og er lægri enn í øllum hinum Norðanlondum. Eisini hava norðurlond ymisk sløg av fastognarskatti samanborið við Føroyar, sum ongan fastognarskatt hevur. Grøn avgjøld er eitt annað dømi.

### Set í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk

Ein nýskipan er at seta í verk eitt fíggjarpolitisk regluverk. Endamálið er at fáa tamarhald á útreiðsluvøkstrinum. Tað vil siga, at eitt hámark skal setast fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðlsurnar kunnu veksa árliga, óansæð hvussu inntøkurnar veksa. At hava eitt hámark fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa, lættir um trýstið á politikararnar at økja um almennu nýtsluna og íløgurnar, tá ið tað gongur væl í búskapinum, og økir harafturat um kredittvirðið hjá landinum, tí regluverkið ger politisku skipanina betri føra fyri at halda rakstrarútreiðsluvøksturin undir einum hámarki. Umráðandi er, at at regluverkið er greitt og einfalt, at kommunali geirin er fevndur av regluverkinum, at tað fær avleiðingar, um regluverkið ikki verður hildið og at fyri hvørt politisk tiltak skal kunnast um útreiðslurnar og inntøkurnar av hesum tiltakið 10 og 20 ár fram í tíð. Sí eisini frágreiðingarnar hjá Búskaparráðnum frá 2024.

### Broyt fiskidagaskipanina undir Føroyum

Fiskiskapurin undir Føroyum hevur ikki borið seg í langa tíð, hóast tað hevur gingið betri í 2025. Neyðugt er at gera átøk í hesi vinnu, so hon aftur verður lønandi. Tað kann eitt nú gerast við at fara frá at brúka fiskidagar at stýra við til kvotur.

# 06
# Almenn skuld

**Er skuldin ov høg, verður tað truplari at rinda skuldina aftur**

EGS skuld er ein felags standardur, sum EU londini nýta til at gera upp almennu bruttoskuldina. EGS stendur fyri Evropeiska Gjaldoyrasamstarvið, og skuldin verður ofta nevnd ØMU-skuldin eftir danska navninum (den Økonomiske Monetære Union). EGS skuldin fevnir um landið, kommunurnar og grunnar. Skuldin hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlar verður roknað uppí skuldina hjá landskassanum (allir tunlar verða taldir við, men tað er bert ES-tunlarnir, sum hava skuld).

Mynd 6.1 vísir EGS skuldina. Í mai 2020 tók landskassin lán á 1,6 mia. kr. í sambandi við Covid-19, men longu aftur í juni 2021 vóru 1.350 mió. kr. av skuldini afturrindaðar. Í 2021 og 2022 minkar EGS-skuldin, men veksur við áleið 500 mió. kr. í 2023. Føroyska EGS skuldin var í 2024 31,5% av BTÚ, sum er eitt vet minni enn EGS skuldin hjá Svøríki og Danmark, sum samstundis eru nøkur av teimum londunum í EU sum hava lægst EGS skuld, sí mynd 6.1. Við ársenda 2025 verður EGS-skuldin í Føroyum mett at vera 30% av BTÚ. Sambært ES reglum, skal skuldin ikki vera meira enn 60% av BTÚ. Við at halda skuldina undir 60%, er tað meira sannlíkt, at landið kann halda fíggjarligum støðufesti og hava ráð til at rinda skuldina aftur uttan ov stórar avbjóðingar. Um skuldin er ov høg, kann tað gera tað truplari fyri eitt land at rinda skuldina aftur, serliga um tað kemur í fíggjarligar trupulleikar ella um búskaparvøksturin hasar av.

**Mynd 6.1 EGS-skuld 2020-2025**




Kelda: Landsbanki Føroya, Gjaldstovan, ALS, AMEG, Eystur- og Sandoyartunlar og Hagstova Føroya, Búskaparráðið. Viðm.: BTÚ er uppgjørt frá 2020 til 2023, 2024 og 2025 er meting hjá Búskaparráðnum. EGS-skuldin í 2024 og 2025 er meting hjá Landsbanka Føroya.

Sum mynd 6.2 vísir, eru fleiri av størru búskapunum, har landsmyndugleikarnir hava eina skuld, sum er langt omanfyri markið á 60%. Markið á 60% verður stundum kjakast um, um tað er tað rætta markið, ella um tað skal liggja hægri. Fyri ein pinkubúskap, sum tann føroyska við sera einstáttaðum vinnubygnaði í útflutninginum talar varsemi fyri einum lágum skuldarmarki.

Útgangsstøðið í Føroyum við eina EGS-skuld á 30% av BTÚ er gott. EGS skuldin í tølum er mett at vera um 9 mia. í 2025. Um skuldin var 60% av BTÚ, svarar tað til eina skuld á 18 mia. kr. Tað vil siga, at skuldin helst ikki skal veksa við meira enn 9 mia. kr. (2025 tøl).

**Mynd 6.2 Almenn bruttoskuld í ymsum londum 2024, EGS skuld í % av BTÚ**




Viðm.: Almenn fyrisiting og tænastur, t. e. uttan almennar fyritøkur. Keldur: Landsbanki Føroya (Føroyar), Trading Economics (Ísland, Noreg og Stóra Bretland), Danmarks Statistik.

Tað er umráðandi, at almenna skuldin ikki gerst ov stór, tí renta skal gjaldast av allari skuldini. Í løtuni er rentan lág, men verður rentan hægri enn vøksturin, sum búskapurin veksur við, veksur skuldin skjótari enn inntøkurnar, sum skulu nýtast til at gjalda skuldina aftur við. Um so er, veksur skuldin sum prosent av BTÚ við tíðini. Er realrentan hægri enn reali búskaparvøksturin, noyðast land og kommunur at hava áhaldandi størri avlop til at gjalda skuldina aftur við. Um ikki, kunnu landið og kommunurnar hækka skattirnir ella minka um útreiðslurnar til almennu tænasturnar og veitingarnar fyri at hava pening at nýta til at gjalda veksandi skuldina niður við.

**Framrokning av undirskotinum við Suðuroyartunlinum, um ongar nýskipanir vera framdar**

Ætlanir eru um at gera ein Suðuroyartunnil. Sambært P/F Suðuroyartunnil fer tunnilin at kosta um 4,9 mia. kr. (í føstum prísum) at byggja. Tá ein íløga verður so mikið stór, er eyðsæð, at rásarúmið til at gera aðrar íløgur, sum eitt nú kundu bøtt um haldførisavbjóðingina, verður minni. Harafturat, um ongar nýskipanir ella sparingar vera gjørdar hjá landi og kommunum, koma undirskotini komandi 10 árini at tátta í 6 mia. kr. Netto gevur tað 10,9 mia. kr. Afturat hesum koma tær 9 mia. kr., sum tað almenna frammanundan skyldar. Almenna skuldin verður harvið 19,9 mia. kr. Tey næstu 10 árini væntast at Eysturoyar- og Sandoyartunlarnir rinda runt roknað 1,3 mia. kr. í avdrátti. Samlaða skuldin tá avdrátturin er tikin frá verður tí 18,6 mia. kr. Hetta svarar til 63% av BTÚ í 2025.

# 07
# BTÚ í føstum prísum

Føroyski búskapurin hevur verið í framgongd í góð 10 ár og ein partur av hesum stavar sannlíkt frá, at býtislutfall okkara er betrað í hesum tíðarskeiði. Býtislutfallið batnar, tá ið gongdin í prísunum á útflutningsvørunum í tíðarskeiðum eru betri, enn prísgongdin á vørunum, ið verða innfluttar. Eitt betrað býtislutfall økir um vælferðina eins og realvøkstur í BTÚ ger tað. Hinvegin verður BTÚ í føstum prísum oftani nýtt, tá ið búskaparvøkstur skal samanberast tvørturum lond. BTÚ í føstum prísum sáldar prísvøksturin frá og vísir, hvussu framleiðslan er økt tá prísgongdin er tikin burturúr, og mátar virðisskapanina sum mongdir av framleiddum vørum og tænastum. BTÚ í føstum prísum er uppgjørt fram til og við 2024, sí mynd 7.1.

**Mynd 7.1 BTÚ vøkstur í ársins og føstum prísum**




Viðm.: 2023 og 2024 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2025 - 2027 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
Kelda: Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Mynd 7.2 vísir árliga vøksturin í virðisskapanina, ið verður rópt bruttovirðisøking (BVØ[15]) í føstum prísum í tíðarskeiðinum 2020 – 2024 saman við vakstrarískoytunum frá ymsu vinnugreinabólkunum. Í 2021 og 2022 kom realur búskaparvøkstur av, at føroyski búskapurin fótaði sær eftir Covid-19 farsóttina, umframt at útflutningurin av makreli og laksi vaks. Síðani tykist búskapurin at vera farin niður í ferð. Í 2022 stavaði helvtin av ískoytinum til vøksturin frá tænastuvinnunum og hin helvtin frá tilfeingisvinnuni; í 2022 vaks veiðan av uppsjóvarfiski, meðan tøkan í alivinnuni minkaði eitt vet. Í 2023 gav tilfeingisvinnan størsta positiva vakstrarískoytið til bruttovirðisøkingina. Hesin vøkstur stavaði serliga frá øktari heildarveiðu av ávísum fiskasløgum. Eitt nú var heildarveiðan av svartkjafti góð 80 prosentstig størri í 2023 enn árið fyri og heildarveiðan av makreli góð 30 prosentstig størri. Positivu vakstrarískoytini frá tænastuvinnuni og framleiðsluvinnuni stavaðu serliga frá sjóflutningi og byggivinnuni í 2023.

Í 2024 var vøksturin í realu bruttovirðisøkingini 0,6%. Tilfeingis- og tænastuvinnurnar togaðu bruttovirðisøkingina upp í 2024. Í tilfeingisvinnuni vuksu nøgdirnar av útfluttum laksi, svartkjafti og upsa í 2024 samanborið við 2023.

**Mynd 7.2 Real bruttovirðisøking og vakstrarískoyti**




Kelda: Hagstova Føroya.

Í 2024 togaði framleiðsluvinnan realu virðisøkingina niður. Hetta kom millum annað av, at ein partur av framleiðsluni hjá alivinnuni í 2024 var løgd soleiðis til rættis, at útflutningurin varð fluttur til byrjanina av 2025, heldur enn við árslok 2024, vegna væntanir um betri prísir. Eisini segði byggivinnan frá ringum veðri sum orsøk til lægri virksemi í 2024. Harafturat var eitt verkfall hjá arbeiðarafeløgunum í 2024, ið tálmaði virksemið í eitt nú byggivinnuni og flakavirkjunum í øðrum ársfjórðingi. Eisini var ILA staðfest í ávísum alibrúkum á vári 2024, ið minkaði tøkuna av laksi við 2-3 túsund tonsum.

Mett verður, at reali búskaparvøksturin í 2025 verður hægri, enn í 2024. Orsøkirnar eru millum annað øktar nøgdir av útfluttum laksi í 2025 samanborið við í 2024, og harafturat at viðurskiftini, sum togaðu realvøksturin niður í 2024, ikki hava gjørt seg galdandi í 2025.

**Mynd 7.3 Bruttovirðisøking skift á vinnugreinar (%), 2024**




Kelda: Hagstova Føroya.

Mynd 7.3 vísir bruttovirðisøkingina í 2024 skift á vinnugreinar. Tilfeingisvinnan umboðar fiskiveiðu og aling, og hon stóð fyri 18% av bruttovirðisøkingini í 2024. Framleiðsluvinnan stóð fyri 21% av bruttovirðisøkingini í 2024. Í framleiðsluvinnuni eru matvøruídnaður (flakavirkir og kryvjivirkir hjá alivinnuni) og eitt nú byggivinnan. Bruttovirðisøkingin hjá framleiðsluvinnuni var lægri í 2024, enn í 2023, ið sæst sum eitt negativt vakstrarískoyti í mynd 7.2. Tænastuvinnan stóð fyri 61% av bruttovirðisøkingini í 2024. Tænastuvinnur fevna eitt nú um flutning, sølu, gisti- og matstovuvinnu, men almennar tænastur so sum heilsu- og almannaverk og undirvísing standa fyri áleið helvtini av tænastuvinnuni.

Mynd 7.4 (til vinstru) vísir realvøksturin í BTÚ fyri hvønn íbúgva og BTÚ fyri hvørt starvsfólk seinastu 10 árini. Yvirskipað sæst ein vøkstur í virkseminum seinastu árini, hóast vøksturin tykist at vera minkandi síðani 2021. Gongdin í 2020 er eitt greitt undantak orsakað av Covid-19, ið merkti búskaparliga virksemið hetta árið.

Munurin millum uppgerðina av BTÚ pr. íbúgva og BTÚ pr. arbeiðara í tíðarskeiðinum 2015 til 2022, kemur av eini lutfalsliga størri tilgongd av starvsfólkum samanborið við fólkavøksturin. Í 2023 og 2024 er tilgongdin av starvsfólki og fólkavøksturin meira eins. Sambært Hagstovu Føroya var realvøksturin í BTÚ 3,2% í 2023 og 0,8% í 2024 (sí mynd 7.1). Til samanberingar var vøksturin í bæði BTÚ pr. íbúgva og BTÚ pr. arbeiðara 2,3% í 2023 og 0,3% í 2024.

**Mynd 7.4 Realvøkstur í BTÚ (fyri hvønn íbúgva og fyri hvørt starvsfólk) og BTÚ fyri hvønn íbúgva í ársins prísum í útvaldum norðurlondum, 2024.**







Viðm.: Í myndini til vinstru er talið av starvsfólki eitt ársmiðal av arbeiðsvirknum í skrádátum hjá Hagstovuni. Myndin til høgru omanfyri vísir BTÚ í 2024 per íbúgva í ársins prísum umroknaðar til DKK. Grønlendsku tølini eru er fyri 2023, tí eingin uppgerð fyri 2024 er tøk. Kelda: Hagstova Føroya, Heimsbankin (World Bank) og egnar útrokningar.

Mynd 7.4 (til høgru) vísir BTÚ fyri hvønn íbúgva í Føroyum og útvaldum norðurlondum. Føroyski búskapurin hevur verið í framgongd seinastu árini, og samanborið við grannalond okkara er virðisskapanin fyri hvønn íbúgva áleið 0,5 mió. kr. árliga, ið er áleið sama støði, sum í Danmark. BTÚ tekur ikki hædd fyri prísvøkstri og livikostnaði. Samanlagt geva myndirnar eina ábending um, at føroyski búskapurin er í framgongd, hóast vøksturin tykist

at vera minkandi, samstundis sum ein størri partur av vøkstrinum tykist at vera knýttur at øktum fólkatali og fleiri starvsfólkum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Mynd 7.5 vísir bruttovirðisøkingina hjá vinnuligum feløgum býtt á ávikavist samsýning til arbeiðsmegina og kapitalin. Sambært myndini er ein alsamt veksandi partur av virðisøkingini fallin kapitaleigarunum í lut (ein øking frá 26% í 2008 til 45% í 2024). Í myndini sæst, at tað vóru kapitaleigararnir og ikki arbeiðsmegin, sum í 2020 mistu inntøku orsakað av Covid-19. Tað sama sæst í 2024. Lægri útflutningurin hjá laksaalarum vegna tað at ein partur av tøkuni var útsett frá 2024 til í byrjanini av 2025, umframt lægra úrtøkan vegna ILA í aliringunum, kunnu vera nakrar av orsøkunum til, at samsýningin til kapitaleigararnar minkar í 2024.

Tað er ymiskt frá landi til landi, hvat samsýningin til ávikavist kapitalin og arbeiðsmegina er; sambært hagtølum hjá OECD var prosentparturin av bruttovirðisøkingini, sum fall kapitaleigarunum í lut í 2024 eitt nú 32% í Svøríki og Italia, 30% í Danmark, 24% í Stóra Bretlandi, 22% í Týsklandi og 19% í Fraklandi.[16]

**Mynd 7.5 Samsýning til arbeiðsmegi og kapitaleigarar hjá ikki-fíggjarligum feløgum**




Viðm.: Bruttosamsýning til arbeiðsmegina er løn og atknýtt gjøld hjá starvsfólki í ikki-fíggjarligum feløgum. Bruttosamsýning til kapitaleigarar er bruttorakstraravlop og blandað inntøka hjá ikki-fíggjarligum feløgum. Kelda: Hagstova Føroya.

# Fylgiskjal

## Gjaldsjavnin

### Tað er avlop á gjaldsjavnanum

Gjaldsjavnin vísir fíggjarligu viðurskftini millum Føroyar og umheimin. Tað er ein uppgerð av millum annað, hvat verður útflutt og keypt úr útlondum, og hvat vit eiga og skylda uttanlands. Gjaldsjavnin verður lýstur við eini leypandi uppgerð (rakstrarviðurskifti gjaldjavnans), og eini árligari kapitaluppgerð (kapitaljavnin), sum ger upp ogn og skuld millum Føroyar og umheimin. Hava Føroyar skuld mótvegis útlondum, er nettoognin negativ, og tað merkir, at lántøka úr útlondum er neyðug, ella við øðrum orðum kann sigast, at okkara uppsparing ikki røkkur til okkara nýtslu og íløgur. Er nettoognin hinvegin positiv merkir tað, at Føroyar hava avlop og uppsparing mótvegis umheiminum, ið merkir, at útlond hava skuld til Føroya.

**Mynd 1 Kapitaljavnin 2003 - 2024**




Kelda: Hagstova Føroya.

Mynd 1 vísir kapitaljavnan býtt á geirarnar ikki-fíggjarlig feløg (vinnan), fíggjarlig feløg, húsarhald, og almenn fyrisiting og tænasta.[17] Nettoognin var 4,7 mia. kr. í 2024, ið svarar til nærum 17% av BTÚ í 2024. Nettoognin minkaði í 2024 samanborið við 2023 við nærum ½ mia. kr. Hetta kemur millum annað av, at føroyskar ikki-fíggjarligar fyritøkur øktu um sína skuld í 2024. Hinvegin er nettoognin økt hjá fíggjarfeløgunum í 2024 samanborið við í 2023. Ognin hjá fíggjarfyritøkunum er millum annað pensjónsuppsparingar, sum pensjónsfeløgini og peningastovnarnir umsita fyri privatfólk, og í 2024 hava fíggjarfeløgini skift frá íløgum í lánsbrøvum til íløgur í partabrøv.[18] Ein partur av uttanlandsskuldini stavar frá, at virðið á føroyskum partabrøvum, sum útlendingar eiga, vóru hægri við árslok 2024 samanborið við árslok 2023, og tí er skuldin økt yvirfyri útlondum í 2024.

Viðurskiftini millum Føroyar og útlond verða eisini lýst við eini rakstraruppgerð, sí mynd 2. Rakstraruppgerðin telur saman inntøkur frá útflutningi og útreiðslur av innflutningi, lønarinntøkur hjá føroyingum, sum arbeiða hjá útlendskum arbeiðsgevarum,[19] umframt lønarútreiðslur hjá føroyskum arbeiðsgevarum goldnar til útlendingar, sum búgva uttanlands. Harafturat teljast veitingar til og úr útlondum við, tað eru eitt nú ríkisveitingin úr Danmark og eftirlønar- og tryggingargjøld.

**Mynd 2 Rakstrarviðurskifti gjaldsjavnans 2004 - 2024**




Kelda: Hagstova Føroya.

Í 2024 var avlopið á rakstrarviðurskiftum gjaldsjavnans 1,9 mia. kr. og tað er ein vøkstur á 600 mió. kr. samanborið við avlopið í 2023. Tað er avlop av rakstrar- og lønarflytingum, og vørum og tænastum. Tað vil siga, at tað hava verið útflutt fyri størri virðir, enn tað hava verið innflutt fyri og lønirnar, sum føroyingar, sum arbeiða uttanlands hava fingið, hava verið størri, enn lønirnar, sum føroyskir arbeiðsgevarar hava flutt til útlendingar uttanlands. Rakstrarflytingar geva somuleiðis eitt positivt íkast til avlopið í 2024, tað er millum annað ríkisstuðulin úr Danmark. Hinvegin geva íløgu- og fíggingarvirksemi hall í 2024, og tað kemur av, at útlendingar hava fingið eitt vet størri avkast av sínum íløgum í føroysk virðisbrøv, enn føroyingar hava fingið av sínum íløgum í útlondum.

# Keldur

Akstovan
Avrik sp/f
ALS
AMEG
Betri Banki
Danmarks Statistik
Eystur- og Sandoyartunlar
Felagið Nótaskip
Fishpool.eu
Fíggjarmálaráðið
Føroya Banki
Gjaldstovan, Búskaparskipan Landsins (BSL) og landsroknskapurin
Hagstova Føroya
Havstovan
International Monetary Fund, IMF
Kommunufelag Føroya
Landsbanki Føroya
OECD
Samrøður við fyritøkur í fiskivinnuni
Samrøður við fyritøkur í alivinnuni
Skyn
Trading Economics
Vinnuhúsið
Vørn

# Tíðindaskriv

2. mars 2026

## Hjólini mæla framvegis við góðari ferð

*Fyri 2026 er vøksturin í BTÚ í leypandi prísum mettur at gerast 6,2%. Tað eru fyrst og fremst privata nýtslan og útflutningurin, sum toga vøksturin upp í 2026. Landskassin og kommunurnar hava framvegis hall, og neyðugt er at fremja umfatandi nýskipanir og sparingar. Eisini eigur politiski myndugleikin at taka avbjóðingina við manglandi bústøðum í álvara, tí ein týðandi fortreyt fyri at fáa fólki á støðast í Føroyum er, at tað er møguligt at fáa eitt býli.*

### Búskaparligu vísitølini eru positiv

Vøksturin í BTÚ í 2026 er mettur at verða 6,2% og 3,3% í 2027. Tað eru fyrst og fremst privata nýtslan og útflutningurin, sum toga vøksturin upp, men almenna nýtslan og privatu íløgurnar geva eisini síni íkast til vøksturin í BTÚ í 2026. Somu viðurskifti toga vøksturin upp í 2027. Fyri pelagiska fiskiskapin væntast betri prísir í 2026 og kvotuniðurskurð á makreli og svartkjafti. Harafturat væntast ein vøkstur í bæði nøgd og prís á laksi, ið merkir, at útflutningsvirðið væntast at økjast í 2026. Í búskapinum mæla hjólini framvegis við góðari ferð. Starvsfólkatalið er veksandi, arbeiðsloysið er lágt, og stórur vøkstur er í lønargjaldingunum. Treystið hjá húsarhaldunum er óbroytt í nýggjastu brúkarakanningini, og kortnýtslan er økt í 2025. Peningastovnarnir vísa á, at fíggjarliga støðan hjá húsarhaldunum er batnað vegna lønarhækkingar og rentulækkingar, og harafturat er inflatiónin lág.

### Land og kommunur hava framvegis hall

Hallið í landskassanum er mett at vera 50 mió. kr. í 2025, 368 mió. kr. í 2026 og 207 mió. kr. í 2027. Í heyst metti Búskaparráðið saman við Fíggjarmálaráðnum, at úrslitið á fíggjarlógini fyri 2025 fór at vera eitt hall á 390 mió. Fyribils metingin er tó, at hallið verður 50 mió. kr. í 2025. Tað er væl betri enn mett í heyst, og tað er gott. Høvuðsorsøkin er, at raksturin er betraður.

Tað er tó framvegis hall í landskassanum í allarbestu búskaparligu tíðum. Somuleiðis væntast hall hjá kommununum. Tá ið almennar útreiðslur til rakstur og íløgur veksa í góðum tíðum er tað við til at gera búskapin yvirhitaðan, og alt samfelagið rindar fyri tað við hægri prísum. Samstundis er eingin uppsparing til tá tíðirnar venda, har tað tískil kann gerast neyðugt at spara. Tað er bráðneyðugt at fáa búskapin hjá tí almenna at hanga saman búskaparliga nú og í framtíðini, men politiski myndugleikin er sera trekur at gera tær nýskipanir og sparingar, ið skula til. Eitt nú eru ætlanir um at fara undur at bora ein tunnil til Suðuroyar – áðrenn loysn er funnin á avbjóðingini at tryggja fíggjarpolitiska haldførið. Tað er ábyrgdarleyst. Neyðugt er at gera eina ítøkiliga ætlan fyri, hvussu málið um fíggjarpolitiskt haldføri verður nátt. Henda risa avbjóðing eigur at vera tikin í álvara.

### Setið í verk nýskipanir og sparingar

Nøkur dømir á nýskipanir og sparingar er at lække talið av kommunum, at fáa dupultfunktiónir burtur á eitt nú sjúkrahúsøkinum og millum land og kommunur á almannaøkinum. Somuleiðis eru nógvir smáir fólkaskúlar og stovnar bæði í almannaverkinum og á eldraøkinum. Fyri at betra um fíggjarliga úrslitið eru møguleikar at betra um inntøkurnar. Til ber at økja um tilfeingisinntøkurnar frá fiskivinnuni og alivinnuni. Annað dømi er at økja partafelagsskattin, sum er lægri í Føroyum enn í øllum hinum Norðanlondunum.

### Bústaðartrotið má takast í álvara

Veksandi sethúsaprísirnir benda á, at útboðið av bústøðum framvegis er ov lágt. Neyðugt er, at politiski myndugleikin ger nakað fyri at veksa um útboðið av bústøðum, tí ein týðandi fortreyt fyri at fáa fólki at støðast í Føroyum, er at tað er møguligt at fáa eitt býli. Kommunurnar eiga sín leiklut í bústaðartrotinum, tí tað eru tær, ið veita byggiloyvi og gera lendi byggiklár. Harafturat standa býli tóm í fleiri kommunum, har tað ber til at áseta bústaðarskyldu og at avmarka stutttíðarleigu. Onnur tiltøk kunnu vera at áseta fastognarskatt og at stigvíst taka rentustuðulin burtur.

### Føroyar eiga at stýra veiðitrýstinum við kvotum

Toskastovnurin er vorðin eitt vet betri fyri, og tí er vandi fyri, at øll skipini fara at leggja seg eftir at fiska tosk nú tá ið prísurin á toski er høgur. Við hesum gerst veiðitrýstið eftir toski ov høgt. Neyðugt er at stýra, hvussu nógvur fiskur verður tikin úr stovninum á hvørjum ári. Mælt verður til at broyta skipanina frá fiskidøgum til kvotur, tí tað verður mett at vera eitt betri stýringsamboð fyri veiðitrýstinum á teimum ymisku fiskastovnunum, bæði lívfrøðiliga og búskaparliga.

# English summary

### Economic indicators remain positive

The Economic Council has in cooperation with Statistics Faroe Islands estimated the GDP growth for the years 2025–2027. The GDP growth at current prices is estimated at 5.8% in 2025, 6.2% in 2026, and 3.3% in 2027. Annual real growth was declining in the years leading up to 2024, when it was only 0.8%, but the real growth in 2025 is expected to be somewhat higher than in 2024.

**GDP at Current Prices, DKK bn. and Growth**

| | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 |
|---|---|---|---|---|---|
| GDP at current prices (DKK bn) | 27.2 | 27.9 | 29,6 | 31,4 | 32,4 |
| Annual growth at current prices (%) | 6.2 | 2.9 | 5,8 | 6,2 | 3,3 |
| Annual real growth (%) | 3.2 | 0.8 | | | |

Note: 2023 and 2024: Statistics Faroe Islands. 2025–2027 are estimates by the Economic Council.
Source: Statistics Faroe Islands and the Economic Council

In the economic report published in autumn 2025, the Economic Council estimated GDP growth at current prices to be 2.0% in 2025, while the new estimate is 5.8% for 2025. The main reason for the large difference is that exports turned out to be significantly stronger in 2025 than expected, driven among other things by increased export volumes of salmon and higher prices for mackerel and demersal fish.

What drives GDP growth in 2026 is private consumption and exports. In addition, public consumption and private investment also contribute to growth in 2026. The same factors drive the growth in 2027, but to a lesser extent than in 2026. For the pelagic fisheries, better prices are expected in 2026, despite quota cuts for mackerel and blue whiting. Furthermore, growth in both volume and price of salmon is expected, meaning that export value is projected to increase in 2026.

Economic activity remains strong. Employment is growing, unemployment is low, and there is strong growth in wage payments. The consumer confidence is unchanged in the latest consumer survey, and the payment card spending increased in 2025. Financial institutions indicate that the financial position of households has improved due to wage increases and interest rate reductions, and furthermore the inflation is low. The retail sector is optimistic and expects higher sales in the coming year. The construction industry is slightly less optimistic and reports having secured work for fewer months than before. In the primary industries, confidence has risen somewhat, likely because demersal fisheries around the Faroe Islands performed very well in 2025.

### Central and local governments continue to run deficits

The central government deficit is estimated to be DKK 50 million in 2025, DKK 368 million in 2026, and DKK 207 million in 2027. In autumn 2025, the central government deficit for 2025 was projected at DKK 390 million. However, preliminary figures now put the deficit

at DKK 50 million – a significant improvement on the earlier forecast. The improvement is mainly due to stronger operating results. Nevertheless, the government is still running a deficit even during the most favorable economic conditions. Likewise, municipalities had a large deficit in 2024, but in 2025 the municipal results are expected to improve compared to 2024. Allowing rising public revenues due to economic growth to lead into unrestrained growth in public expenditures is not sound fiscal policy. This contributes to overheating the economy, and the whole society pays for it through higher inflation. Moreover, without fiscal reserves to fall back on when conditions eventually deteriorate, the government may be forced to cut spending during a downturn – potentially deepening the decline.

There is an urgent need to make the budget balance, both now and for the future, yet the political authorities remain highly reluctant to implement the necessary reforms and savings. For example, the Parliament has just approved proceeding with the preparation, engineering, and tendering of a subsea tunnel to Suðuroy — before any plan for fiscal sustainability is in place. The estimated cost is roughly 5 billion DKK (which is around 15% of the Faroese GDP) while projections show growing deficits in the fiscal budgets over the next 10 years without reforms. That is irresponsible. A comprehensive plan for achieving fiscal sustainability is essential.

**Implement reforms and savings**

Examples of reforms and savings include reducing the number of municipalities, eliminating duplicate functions such as in the hospital sector and between central and local government. Furthermore, there are numerous small primary schools and institutions in both the social agencies and elderly care. On the revenue side, it is possible to increase resource rent revenues from fisheries and aquaculture industries. Another option is to raise the corporate tax rate, which is currently lower in the Faroe Islands than in all the other Nordic countries.

**The housing shortage must be taken seriously**

House prices continue to rise, indicating that supply remains too low. Political authorities must act to increase the housing supply. Access to housing is a key prerequisite for attracting and retaining residents in the Faroe Islands. The municipalities bear their share in the housing shortage, as they are the ones granting building permits and preparing land for construction. Furthermore, houses are vacant in several municipalities. Possible measures include imposing residency requirements and limiting short-term rentals. Other measures could include introducing a property tax, which would limit demand and stabilize price trends, as well as a gradual phasing out of the mortgage interest rate subsidy.

**The Faroe Islands should manage fishing pressure with quotas**

The cod stock has improved somewhat, and with high prices, there is a risk that all vessels will target the species. This can potentially push the fishing pressure on cod to unsustainable levels. It is necessary to manage annual catches, and thus how much fish is taken from the stock each year. It is recommended to replace the current fishing days system with quotas, which are considered a more effective tool for managing fishing pressure across different stocks – both biologically and economically.

# Notur

[1] *Resilient growth as technology and adaptability offset trade policy headwinds*, World Economic Outlook Update, Januar 2026, imf.org

[2] Bilasøla av persónbilum til privata nýtslu. Ein lítil mangul er í tølunum av seldum leigubilum, tí nakrar skrásetingar mangla. Tær telja tó einans 5,7% av samlaðu brúktbilasøluni í 2023 og tí skal væntast at brúktbilasølan er eitt lítið vet hægri í 2024 enn víst her. Kelda: Akstovan.

[3] Skyn, tíðindi 21.01.26, *"Húsaprísurin hækkaði 13% í 2025"*.

[4] Sambært tíðindaskrivi hjá Landsbanka Føroya (26 novembur 2025) uppliva bankarnir, at rentulækkingarnar hava betrað um fíggjarstøðuna hjá privatkundunum, og at eftirspurningurin eftir fígging er øktur.

[5] Sí eisini Landsbanki Føroya, Fíggjarligt støðufesti, 1. hálvár 2025, 9. Juli 2025 um orsøkir til prísvøksturin á sethúsamarknaðinum.

[6] Hagstova Føroya.

[7] Hagstova Føroya, Tíðindi 19.08.2025 "*Vit innflyta fyri nærum 140 milliónir krónur av lýsi*"

[8]Eindarprísurin er roknaður sum útflutningsvirðið deilt við útfluttu nøgdirnar fyri ávís fiskasløg. Eindarprísurin tekur ikki hædd fyri hagreiðing og viðgerðarhátt á produktinum sum verður útflutt. Tað kann tískil hava ávirkan á eindarprísin, um eitt nú mongdin av flak veksur.

[9] Her verður tosað um eindarprísir, tað vil siga útflutt virði av toski, hýsu og upsa býtt við útfluttu nøgdunum av hesum fiskasløgum. Tað verður ikki tikið atlit at, hvørt sumt av hesum fiskasløgum verður útflutt tilvirkað. Tilvirkaðar vørur kunnu toga eindaprísin upp.

[10] ICES/Havstovan.

[11] Sí eisini várfrágreiðingina hjá Búskaparráðnum frá várið 2022.

[12] Í úrslitinum fyri 2022 og 2023 er atlit tikið at, at partar av tilfeingis- og rentuinntøkunum skula í Búskapargrunnin, (les meira um búskapargrunnin í Várfrágreiðingini hjá Búskaparráðnum í 2024) so tey eru samanberilig við úrslitunum fyri árini 2024 og fram.

[13] Miðaleykajáttanir fyri 2021-2025 er 150 mió. kr., men partur av hesum er til H-bygningin.

[14] Frágreiðing Búskaparráðsins um haldførið, januar 2024.

[15] BVØ er tað sama sum BTÚ, men frároknað vøruskattir og ymisk gjøld (MVG, toll- og skrásetingargjøld) og frároknað vørustudning (t.d. landbúnaðarstuðul).

[16] Value-added in non-financial corporations, Percentage of net value added, 2024, OECD.org. Myndin hjá OECD vísir lutfallið sum arbeiðsmegin fær í lut. Lutfallið, sum kapitaleigarin fær í lut er tískil ”compensation of employees of non-financial corporations” minus 100).

[17] Ikki-fíggjarlig feløg eru privatar og almennar fyritøkur (vinnan), meðan fíggjarlig feløg eitt nú eru peningastovnar og trygginga- og pensjónsfeløg. Húsarhald eru løntakarar, pensjónistar, sjálvstøðugt vinnurekandi og NPISH. Almenn fyrisiting og tænasta fevnir um land, kommunur og sosialir grunnar; almennar fyritøkur eru ikki íroknaðar, tí tær teljast við undir ‘ikki-fíggjarlig feløg’.

[18] Tíðindaskriv hjá Hagstovu Føroya 9. oktober 2025, ”Føroyar høvdu 4,7 mia. kr. í nettoogn uttanlands í 2024”.

[19] Eitt nú DIS, NIS, útlendsk fiskiskip og frálandavinna og arbeiði á landi; td. handverkarar. Harafturat eru ognarinntøkur frá beinleiðis íløgum og íløgum í virðisbrøv og lánsbrøv, umframt rentur av inn- og útlánum, og handilskredittir taldar við.